# Føroya Arbeiðsgevarafelag
# Ársfrágreiðing 2008

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

## Frágreiðingin frá nevndini

Seinasta árið hevur verið avbjóðandi fyri føroyska vinnu. Árið 2008 byrjaði við eini ábending um, at útlitini ikki vóru fult so góð sum undanfarin ár. Ongin væntaði tó, at fíggjarheimurin skuldi renna seg meira ella minni fastan í heyst.

Sonevnda fíggjarkreppan er vorðin búskaparkreppa um allan heim, og merkist hetta eisini í Føroyum. Flestu vinnugreinar merkja, at tað er fall í eftirspurninginum, og at tað er trupult at fáa fígging til nýtt og verandi virksemi. Nógvar fyritøkur hava verið noyddar at tillaga raksturin til broyttu umstøðurnar og hava sum úrslit av hesum sagt fólk úr starvi.

Byggivinnan og partar av útflutningsvinnuni eru millum tær, sum eru harðast raktar. Sera stórt virksemi hevur verið í byggivinnuni í fleiri ár, men eftirspurningurin steðgaði nærum upp í byrjanini av 2009.

Útflutningsvinnan er somuleiðis undir trýsti. Hetta tí, at fiskasløgini toskur og hýsa eru fallin munandi í prísi og nøgd, meðan tey bíligari fiskasløgini hava hildið prísin. Somuleiðis eru umstøðurnar fyri útflutning eru vorðnar nógv truplari, tí tað hevur verið sera torført at fáa trygging av keyparum orsakað av fíggjarkreppuni.

Partar av veiðiliðnum, serliga húkaflotin, eru somuleiðis stórliga ávirkaðir av fallandi prísum á toski og hýsu. Partur av hesum er sjálvsagt eisini, at fiskiskapurin eftir toski og hýsu er fallin sera nógv, tí hesir fiskastovnar eru illa fyri í løtuni. Partrolaraflotin hevur hinvegin havt góðan fiskiskap higartil í ár, eins og upsaprísurin hevur hildið sær uppi.

Innan sáttmálasamráðingarøkið hevur undanfarna ár verið lutfalsliga friðarligt. Í 2008 hevur FAG yvirtikið sáttmálar fyri flogmanningar og flogmekanikarar. Tilsamans varar FAG nú av 26 sáttmálum og sersáttmálum, sum fevna um meginpartin av privata arbeiðsmarknaðinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur seinnu árini átikið sær ein leiklut sum viðmerkjari til, hvussu føroyska samfelagið er skipað. Hetta metir nevndin í felagnum verða umráðandi, tí tað er vinnan, sum er grundarlagið undir fíggingini av vælferðarsamfelagnum Føroyar og framleiðir tey virðir, ið verða skapt til samfelagið.

Í Føroyum búgva nærum 50.000 fólk, sum vilja hava eitt livistøði, sum er kappingarført í mun til londini kring okkum. Føroya Arbeiðsgevarafelag vil sjálvandi eisini tað, men heldur samstundis, at tað er umráðandi, at vit finna skilagóðar loysnir, sum hóska til ta fíggjarorku vit hava.

Í hesi ársfrágreiðing hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag valt at fokusera á almenna sektorin, fiskivinnuna og orkuspurningin og kemur við tilmælum um hetta í ársfrágreiðingini. Almennu útreiðslurnar eru sera nógv øktar seinnu árini. Stórt hall er á fíggjarløgtingslógini í ár. Roknað verður eisini við uppaftur størri halli næsta ár.

Vinnuvirkir merkja, at tey eru í kapping við tað almenna um tænastur, og tað er als ikki nøktandi. FAG mælir tí til, at tað almenna fremur munandi útveiting av tænastum og lækkar útreiðslurnar yvirhøvur við tillagingum.

Føroyska fiskivinnan sum heild er illa fyri fíggjarliga. Úrslitini seinnu árini hava verið vánalig, og fiskiskapurin minkaður. Spurningurin er, um skipanin fyri fiskiskapin undir Føroyum er nóg góð, tá tað vísir seg, at vinnan ikki klárar at konsolidera seg og enn minni endurnýggja seg. FAG mælir til, at skipanin fyri føroyska fiskivinnu verður tikin upp til endurmetingar við tí fyri eyga at skipa eina vinnu, sum er lívfrøðiliga burðardygg og búskaparliga haldfør og gangnýtir tilfeingið á ein hátt, sum kastar mest møguligt av sær til bæði vinnuvirkir og samfelagið sum heild.

Viðvíkjandi orkuspurninginum so merktu vit í 2008, hvussu viðkvom vinnan er fyri høgum

oljuprísum. Tí er tað umráðandi, at minka um hendan vansan og virka fyri, at Føroyar og føroysk vinna fremja orkusparing og alternativa orkuframleiðslu. Somuleiðis er neyðugt, at Føroyar ganga undir altjóða avtalur innan avmarking av CO2. Tað fremur okkara umdømi at taka ábyrgd saman við øðrum. Gera vit tað ikki, so kann tað hinvegin gerast ein forðing fyri, at útflutningsvinnurnar fáa selt sína vøru í framtíðini.

Samanumtikið kann sigast, at gongdin í 2008 og higartil í 2009 hevur sett vinnuna undir trýst og kravt stórar tillagingar. Sum sæst í frágreiðingini, vænta vit tí eisini, at tilllagingar verða framdar innan tað almenna, eins og vinnuni verða veittir so góðir karmar sum gjørligt.

12. juni 2009

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag,

Jóhan Páll Joensen, formaður

## INNIHALDSYVIRLIT


**FRÁGREIÐINGIN FRÁ NEVNDINI** ..... 1

**INNGANGUR** ..... 2

**HVAT SKAL NÚ GERAST? TILMÆLIR FRÁ FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** ..... 3

ALMENNI SEKTORURIN ..... 3
*Bygnaður í miðfyrisitingini* ..... 3
*Útreiðslustøðið er alt ov høgt í mun til inntøkurnar* ..... 4
*Tálming av almennu rakstrarút-reiðslunum* ..... 6
*Útveiting og alment innkeyp* ..... 6
*Framhaldandi privatisering* ..... 7
*Hallið á fíggjarlógini* ..... 8
*Skattapolitikkurin* ..... 8
*Eftirlønarskipan* ..... 8
*Symmetri millum rentustuðulin og skatt av innistandandi* ..... 8
*Niðurlaging av frádrátti av mvg av handverkaralønum* ..... 9
FISKIVINNAN Á EINUM VEGAMÓTI ..... 10
FOKUS Á ORKUNÝTSLU ..... 12

**MÁL Í 2008** ..... 14

MÁL, SUM VÓRÐU AVGREIDD Í 2008 OG HIGARTIL Í 2009 ..... 14
MÁL, SUM IKKI ERU LOYST, OG ONNUR MÁL ..... 15
FRÁGREIÐINGAR ..... 16
*Orka og umhvørvið* ..... 16
*Kanning av motivatiónsfaktorum* ..... 16

**SÁTTMÁLAVIÐURSKIFTI OG FØROYSKI ARBEIÐSMARKNAÐURIN** ..... 18

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR Í 2008 OG 2009 ..... 18
*Manningarfeløgini á sjónum* ..... 18
*Manningarfeløgini í luftini* ..... 18
*Sáttmálasamráðingar fyri framman* ..... 19

**TILTØK 2008** ..... 20

NEVNDIN Í FØROYA ARBEIÐSGEVARA-FELAG Á VITJAN Í BRÚSSEL ..... 20
VINNUNÁM ..... 20
VINNUDAGURIN 2008 ..... 21

**GONGDIN INNAN YMISKU VINNUGREINARNAR** ..... 23

FISKI- OG FLAKAVINNAN ..... 23
*Gongdin í fiski/flakavinnuni* ..... 23
*Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu* ..... 24
*Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu* ..... 25
ALIVINNA ..... 25
HANDVERKSVINNAN ..... 27
*Gongdin í handverksvinnuni* ..... 27
*Útlit fyri handverksvinnuna* ..... 29
REKLAMUVINNAN ..... 30
FERÐAVINNA ..... 30
HANDILSVINNA ..... 31
OLJUVINNAN ..... 32
FÍGGJARVINNA ..... 33
SHIPPINGVINNAN ..... 34

**UM FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG, VINNUHÚSIÐ OG FELØGINI ANNARS** ..... 35

NEVNDIN Í FØROYA ARBEIÐSGEVARA-FELAG ..... 35
HVØR HÚSAST Í VINNUHÚSINUM ..... 37

# Inngangur

Føroya Arbeiðsgevarafelag umboðar flestu arbeiðsgevarar í landinum, og er virksemið hjá okkara limum sum heild, grundarlagið undir samfelagnum. Sum ein týdningarmikil spælari í føroyska samfelagnum átekur Føroya Arbeiðsgevarafelag sær leiklutin sum viðmerkjari og viðspælari í mun til, hvussu samfelagið Føroyar eigur at vera skipað. Hetta verður gjørt ásannandi, at góðir karmar fyri vinnu eru nær tengdir at gongdini í samfelagnum.

Ongantíð er hesin leiklutur meira týdningarmikil enn í hesum døgum, tá búskapir um heimin, eisini tann føroyski, hava trupulleikar við at fóta sær.

Í hesi ársfrágreiðingini fyri 2008 nýtir felagið høvi at koma við meiningum um, hvørji trý viðurskifti tað hevur týdning at fokusera uppá næstu tíðina. Hetta fyri at at skapa loysnir fyri føroyska samfelagið, soleiðis at vit koma styrkt burturúr hesum búskaparliga aldudali, vit eru í. Tað eru óiva onnur viðurskifti, sum høvdu verið týdningarmikil at tikið upp, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur valt at fokusera uppá hesi:

- Almenni sektorurin
- Fiskivinnan
- Orku og umhvørvisspurningurin

Árið 2008 byrjaði uttan tekin um, at heimurin við ársenda fór at verða merktur av fíggjarkreppu. Higartil hevur føroyska samfelagið í mun til onnur samfeløg ikki merkt so nógv til fíggjarkreppuna. Hetta sæst m.a. á, at arbeiðsloysið í Føroyum, hóast tað er hækkað, enn ikki er komið á eitt høgt støðið. Í 2008 var arbeiðsloysið á einum søguliga lágum støðið og var í apríl 2009 komið uppá 3,4%. Harafturat er talið av fyritøkum, sum eru farnar á húsagang, ikki hækkað á sama hátt, sum í londunum kring okkum.

Eftir eina tíð við sera lítlum arbeiðsloysi og forðingum fyri at fáa neyðuga arbeiðsmegi til landi eru vinnugreinarnar merktar av, at tær ikki hava kunnað nýtt møguleikan við fleiri ára búskaparvøkstri bæði í Føroyum og á okkara útflutningsmarknaðum til fulnar. Heldur øvugt. Føroyska vinnan líður undir lønarglíðingini, sum er ein nátúrlig avleiðing av, at arbeiðsmegi ikki hevur verið tøk, og at forðingar hava verið fyri innflutningi av arbeiðsmegi. Støðan viðvíkjandi atgongdini til arbeiðsmegi er broytt, men ikki í tann mun, Føroya Arbeiðsgevarafelag kundi hugsað sær. Atgongd til kvalifiseraða arbeiðsmegi til føroysku vinnuna er avgerandi fyri kappingarevnini hjá okkara limum, og tí er tað umráðandi, at til ber at fáa fatur á røttu arbeiðsmegini uttan stórvegis trupulleikar.

Í hesum døgum arbeiða føroyskar fyritøkur við at tillaga seg tann veruleika, at vøksturin, sum hevur verið undanfarin ár, er steðgaður. Tað merkir, at fyritøkurnar hyggja eftir, hvussu til ber at skipa virksemið skilabetri undir øðrvísi fortreytum. Ikki bara í Føroyum, men um allan heimin henda tillagingar, og týdningarmikið er, at vinnan fær høvi at gera hesar rationaliseringar uttan uppíblanding frá tí almenna. Somuleiðis er týdningarmikið, at politiska skipanin og almennu stovnarnir gera sítt besta fyri at veita vinnuni eina so góða tænastu, sum yvirhøvur gjørligt, soleiðis at vinnuvirksemi ikki steðgar av hesum ávum.

Samanumtikið kann sigast, at tað er neyðugt, at føroyska samfelagið ger seg til reiðar til, at búskapurin fer at venda aftur, soleiðis at vit eru før fyri at fáa gagnnýtta tað potentialið, sum verður í teimum veksandi marknaðunum.

## Hvat skal nú gerast? Tilmælir frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Í ár nýtir Føroya Arbeiðsgevarafelag høvi at vísa á nøkur viðurskifti, sum tað hevur týdning, at almenni myndugleikin og vinnan fyrihalda seg til. Sum víst verður á í frágreiðingini frá nevndini, metir Føroya Arbeiðsgevarafelag, at felagið, sum ein týdningarmikil spælari í føroyska samfelagnum, átekur sær leiklutin sum viðmerkjari og viðspælari í mun til, hvussu samfelagið Føroyar eigur at vera skipað.

Tey trý økini fokusera verður uppá eru:

- Almenni sektorurin,
- Fiskivinnan og
- Orku og umhvørvisspurningurin.

### *Almenni sektorurin*

Almenni sektorurin ávirkar vinnuna óbeinleiðis umvegis til dømis skattatrýstið. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur hesar áskoðanir um, hvussu almenni sektorurin kann gerast liðiligari og effektivari.

### Bygnaður í miðfyrisitingini

Almenni bygnaðurin varð umskipaður í 1990'unum. Síðani er farið frá 6 aðalráðum til 9 aðalráð. Hetta átti at havt við sær, at ábyrgdarbýtið gjørdist greiðari, og at miðfyrisitingin styrkist.

Ein styrkt miðfyrisiting er neyðug, men tað er ikki nokk bara at veksa um tali av aðalráðum. Tí meta vit, at tíðin nú er komin til at hyggja at nøkrum av teimum avbjóðingum og trupuleikum, sum standast av, at bygnaðurin í almenna sektorinum er, sum hann er. Upprunaliga ætlanin við umskipanini av miðfyrisitingini var, at Løgmansskrivstovan skuldi hava ein yvirskipaðan leiklut og virka tvørgangandi í mun til hini ráðini.

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir ikki, at Løgmansskrivstovan virkar sum samskipari í samlaðu umsitingini, ella at hon stýrir málum yvirskipað. Tað er mangan soleiðis, at tey sum venda sær til miðfyrisitingina hava eina kenslu av, at tað eru 9 landsstýri og ikki 9 aðalráð, sum eru sínámillum samskipaði. Skottini millum ráðini sýnast at vera høg, og hvørt einstakt ráð livir so at siga í sínari verð. Hetta er óheppið. Somuleiðis er tað framvegis trupult at finna markið millum ráðini, eisini í ítøkiligum málum. Til dømis eru vinnumál fleiri ráðum, og skilmarkingingin millum ráðini er ikki heilt greið fyri vinnuna.

Somuleiðis eru mannagongdirnar í ymisku ráðunum ymiskar í mun til, hvussu samskift verður við vinnuna, og er hetta ikki bert ørkymlandi, men vandi er eisini fyri, at mál detta niðurímillum orsakað av hesum.

Ráðini eiga í størri mun at samskipa fakliga kunnleikan fyri at fáa sum mest burtur úr starvsfólkatilfeinginum, sum er. Somuleiðis er tað neyðugt, at øll miðfyrisitingin arbeiðir á sama hátt, tá tað snýr seg um samskifti við vinnuna, t.d. tá løggáva verður send til hoyringar. Soleiðis er ikki í dag. Flestu ráðini senda løggávu til hoyringar við hóskandi ávaring, meðan onnur ráð ikki gera tað. Til tess at endamálið við eini hoyring skal røkkast, er neyðugt, at hoyringspartarnir hava góða tíð til innanhýsis at viðgera uppskotið, og soleiðis geva viðkomandi hoyringssvar. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at øll ráð eiga at samskifta við hoyringspartar á sama hátt, fyri at tryggja, at tey sum eiga at verða hoyrd, verða hoyrd. Somuleiðis vísir tað seg, at í tíðarskeiðum upp undir freistirnar hjá løgtinginum eru tað lógaruppskot, sum als ikki verða send til hoyringar. Hetta er als ikki nóg gott og Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur frástøðu frá hesum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tí hesi tilmæli:

- At landsstýrið tekur neyðug stig til yvirskipaða samskipan og stýring av málum, sum fevna um fleiri ráð.
- At øll aðalráðini samskifta á sama hátt við hoyringspartarnar.
- At øll løggáva skal sendast til hoyringar, áðrenn hon verður løgd fyri tingið.

## Útreiðslustøðið er alt ov høgt í mun til inntøkurnar

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í fleiri ár eftirlýst, at landsstýrið kemur við uppskotum um nýskapan og effektivisering av almennu fyrisitingini, og at stig verða tikin, sum beina burtur dupultfunktiónirnar í ráðunum. Men støðan tykist bara versna.

Tá umsitingin varð umskipað, vóru 6 aðalstýri. Nú eru 9 aðalráð. Ein tann størsti trupulleikin við at seta fleiri ráð á stovn er, at hjá tí almenna vísir tað seg at vera sera trupult at venda aftur. Uttan at taka dagar ímillum, hvørji aðalráðini skulu vera, heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað ikki átti at verið neyðugt við so nógvum aðalráðum í hesum lítla landinum. Talið á ráðum eigur at skerjast, og má landsstýrið taka truplar avgerðir um eitt nú um at siga fólki úr starvi. Av royndum sæst, at tað er nærum ógjørligt at siga fólki upp hjá tí almenna, men her er helst talan um hugburð heldur enn veruligar forðingar.

Hóast ávíst samstarv er um t.d. vekslara, er gongdin, at hvørt ráð uppbyggir egnar deildir við skjalasavni, fíggjarumsiting, KT og løgfrøði, og tað hevur sjálvsagt við sær, at jú fleiri aðalráðini verða, fleiri verða dupultfunktiónirnar. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ilt við at góðtaka, at samgongusamráðingar skulu elva til, at fleiri ráð verða sett á stovn.

Um ein nýggj samgonga av politiskum orsøkum vil skipa stýringina øðrvísi, má tað kunna gerast uttan at seta fleiri aðalráð á stovn. Føroya Arbeiðsgevarafelagið fer at mæla landsstýrinum til at endurskoða almenna bygnaðin. Landsstýrið eigur at kanna fleiri møguleikar, heruppií møguleikarnar fyri skipanum við tvørgangandi projektorganisatiónum og eini skipan, sum ger tað óneyðugt at seta nýggj ráð á stovn fyri hvønn landsstýrismann. Helst átti at verið umhugsað at havt eina fyrisitingarliga eind, sum var tænastustað fyri øll ráðini.

### Altsamt vaksandi útreiðslur

Seinnu árini eru almennu útreiðslurnar vaksnar munandi. Høga virksemið seinnu árini, og sostatt vaksandi inntøkurnar hjá landskassanum, hevur ikki í nóg stóran mun elvt til, at tað hevur verið yvirskot í almenna kassanum. Harafturat hevur landið økt um útreiðslurnar ár undan ári.

*Mynd 1* vísir gongdina í rakstrarjáttanini, lógarbundnu játtanini og løgujáttanini á fíggjarløgtingslógini frá 2000 til og við 2007. Myndin vísir, at tað serliga eru rakstrarútreiðlsurnar hjá tí almenna, sum eru vaksnar frá 1,4 mia. kr. til 2,2 mia. kr. í hesum 8-ára tíðarskeiðnum. Samlaðu útreiðslurnar til hesar tríggjar játtanirnar eru øktar frá 2,6 mia. kr. til 3,7 mia. kr í sama tíðarskeiði.




*Mynd 1. Gongdin í rakstrar-, lógarbundnari- og løgujáttan á fíggjarlógini frá 2000 til 2007* (www.fmr.fo)

**Mynd 2. Lønarútgjaldingar frá vinnu og tí almenna frá 2000 til 2008 (www.hagstova.fo)**




*Mynd 2* omannfyri vísir eitt dømi um, hvar útreiðslurnar hjá landinum er øktar. Myndin vísir, hvussu lønarútreiðslurnar eru vaksnar hjá tí almenna og vinnuni. Myndin vísir, at almennu lønarútgjaldingarnar eru vaksnar javnt ár undan ári úr 1,5 til 2,5 mia kr frá 2000 til 2008. Hetta er ein vøkstur uppá 66,7 %, og av hesum er bara umleið helvtin sáttmálabundnar lønarhækkingar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er av tí áskoðan, at um so er, at almennu útreiðslurnar veksa javnt ár undan ári uttan mun til konjukturin, so fær landskassin sjálvsagt hall, tá lágkonjukturur er. Hetta er kanska sjálvsagt, men eitt dømi um, hvussu torført tað er at stýra, tá inntøkurnar eru vaksandi. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað vera umráðandi, at ta almenna hyggur eftir rakstrarútreiðslunum og tekur avleiðingarnar av tí stóra vøkstrinum í útreiðslunum.

Búskaparfrøðingar hava víst á, at partur av hallinum hjá landskassanum í hesum tíðum kemst av strukturellum halli umframt teimum alsamt vaksandi útreiðslunum. Tálming av rakstrarútreiðslunum er ein avbjóðing hjá skiftandi samgongum, og uttan miðvísan politikk fyri, hvussu útreiðslurnar skulu tálmast, verður torført at fáa gjørt nakað munagott á hesum økinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur boð uppá, hvussu tað almenna kann tálma útreiðslunum. Hetta er m.a. við at effektivisera almenna raksturin og strammari nýtslustýring, minni fyrisiting og við munandi útveiting. Hesi viðurskifti verða umrødd nærri niðanfyri.

Strukturella hallið, sum er á fíggjarlógini, er ein onnur avbjóðing. Her er neyðugt, at politisku flokkarnir seta seg at viðgera, hvussu hetta hall kann burturbeinast. Arbeitt verður í løtuni við at gera ein eftirlønarreform, og er hetta eisini eitt munagott átak fyri at uppá longri sikt at burturbeina hallið í almenna kassanum. Tað eru tó onnur átøk, sum eisini kunnu gerast. Hetta kundi veri t.d. at tillaga skattaskipanina hjá okkum við at niðurlaga og burturbeina skattalættan til sjómenn. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur boð uppá, hvussu tað almenna kann burturbeina strukturella hallið, og verður hetta somuleiðis viðgjørt nærri niðanfyri.

## Tálming av almennu rakstrarút-reiðslunum

### Avriksmetan og málstýring í almenna verkinum

Tað almenna eigur í størri mun at arbeiða við menningarætlanum í umsitingini og innan tænastuveiting. Her kann nógv gerast. Vit kunnu vísa á avriksmetan, málstýring, benchmarking v.m. Hetta eru uppgávur, sum Løgmansskrivstovan við sínum samskipandi leikluti kundi tikið sær av. Løgmansskrivstovan kundi fingið hini ráðini við og kannað, hvussu umsitingin og tænastuveitingin virka. Eitt nú kundi produktiviteturin verið kannaður.

Fyri nøkrum árum síðani var kjak um avriksløn í almenna sektorinum á lofti. Einki spurdis burturúr hesum. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at hesin táttur verður uppafturtikin fyri at sjónliggera nýtsluna og týdningin av produktivitetinum eisini hjá tí almenna.

Onkur einkultur almennur stovnur hevur gjørt avrikssáttmála við avvarandi aðalráð. Hetta er gongd leið, og mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at avrikssáttmálar framyvir verða kravdir frá øllum almennum stovnum.

### Benchmarking

Ein onnur verkætlan kundi verið benchmarking. Benchmarking-greiningar eru neyvar samanberingar av ymiskum viðurskiftum hjá fyritøkum og stovnum, sum líkjast, eitt nú samanberingar av útreiðslum til umsiting av eins stórum skúlum. Samanberingarnar kunnu skapa grundarlag fyri ábótum. Stovnarnir kunnu læra hvør av aðrari við í størri ella minni mun at hava felags atgongd til innsavnaðu upp-lýsingarnar.

Við benchmarking kann tað almenna kanna dygdina á almennu tænastunum. Minni dugnaligar fyrisitingar kunnu læra av teimum dugnaligaru. Upplagt er, at tað almenna nýtir benchmarking, tí í fleiri førum gera umsitingarnar sama arbeiði. Leggjast kann til brots við at samanbera til dømis fíggjarlig lyklatøl.

Ein týdningarmikil fortreyt fyri at fáa fulla nyttu av benchmarking er, at opinleiki er um úrslitini, so øll síggja, hvar besta málsviðgerðin og tænastuveitingin eru.

### Talgilding av almenna geiranum.

Talgilding av almennum tænastum er ein háttur at effektivisera almenna rakstrurin. Tí eigur mundandi orka at verða løgd í at talgilda almenna sektorinum. Hetta hevði somuleiðis merkt, at borgarin um alt landið hevði fingið lættari atgongd til almennar tænastur.

## Útveiting og alment innkeyp

### Útveiting

Endamálið við útbjóðing av almennum uppgávum er umvegis kapping at fáa størri effektivitet í tann almenna sektorin og tryggja, at almennir pengar og tilfeingi verða gagnnýtt á best møguligan hátt. Seinastu árini við sera stórum virksemi í landinum hava havt við sær, at almennir stovnar hava bygt út sítt tænastuvirksemi orsakað av, at tað hevur verið trupult at fingið loyst uppgávurnar. Nú vísir tað seg, at hetta tænastuvirksemi kappast beinleiðis við vinnuvirksemi og hevur ført til, at vinnufyritøkur eru steðgaðar við at veita hesar tænastur ella eru farnar á húsagang. Hetta ber als ikki til, og mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at almennir stovnar niðurleggja slíkt virksemi, tí tað hoyrir ikki tí almenna til.

Uppgávurnar hjá tí almenna kunnu býtast í myndugleikauppgávur, tænastuveitningar og hjálpifunktiónir. Tað mest nærliggjandi í fyrsta umfari er at bjóða út tænastuveitingar og serliga hjálpifunktiónir.

Vanligt er í øðrum londum at bjóða út uppgávur sum reingerð, rakstur av kantinum, vaktartænastu, viðlíkahald av bygningum, KT-tænastur og rakstur, koyring og verkstaðar-arbeiði. Aðrar uppgávur sum ráðgevingar-virksemi, skeiðvirksemi o.l. kunnu eisini verða bodnar út.

Í Føroyum hava útbjóðingar ikki rættiliga vunnið frama. Áví́s økir eru boðin út, eitt nú busskoyring og innsavning av ruski í Tórshavnar kommunu og ferðafólkakoyring og frakt hjá tí landinum. Hetta hendi fyri nøkrum árum síðani, men tað sær út til, at henda tilgongd heilt er steðgað upp. Føroya Arbeiðs-gevarafelag heldur, at fyri at fáa eina meiri effektiva og fleksibla tænastu til borgaran er tað

alneyðugt, at eftirmetingar verða gjørdar av hesum útveitingum, og at tað verður arbeitt við miðvíst at fáa útveitt størri part av almennu tænastunum.

Kanningar í Danmark vísa, at útbjóðingar í flesu førum hava við sær sparingar úr 10 prosentum upp í umleið 30 prosent í einstøkum førum. Tað vísir seg eisini, at ongin andsøgn er í tí at hækka tænastustøðið og tí at spara. Í 64 prosentum av førunum eru staðfestar bæði sparingar og hækkað tænastustøði. Kommunurnar uppliva, at tær fáa ta dygd, tær rinda fyri. Útbjóðingarnar gera eisini, at kommunurnar leggja størri dent á at skipa arbeiðini, stýra tilfeinginum og menna dygdina.

Fyri at seta ferð á útbjóðingarnar av almennum uppgávum eigur landsstýrið at orða ein politikk á økinum og leggja eina ætlan um, hvussu útbjóðingar kunnu fremjast í verki. Ásett eigur at vera, hvørjar uppgávur eru egnaðar at bjóða út, og at hesar regluliga skulu bjóðast út.

Landsumsitingin kundi veitt kommununum ráðgeving um, hvussu útbjóðingar kunnu setast í verk. Somuleiðis eiga tær royndir, sum hóast alt eru fingnar til vega í Føroyum í sambandi við útbjóðingar, at verið savnaðar.

At bjóða uppgávur, sum tað almenna hevur røkt, út er uttan iva ein trupul uppgáva, ikki minst tí tað ávirkar starvsfólkaviðurskiftir. Útbjóðingarleiðin má tó gangast fyri at tryggja, at almennir pengar og tilfeingi verða gagnnýtt á bestan hátt.

### Alment innkeyp - skipan

Í føroyska samfelagsbúskapinum er almenni parturin lutfalsliga stórur, og tí má tað almenna rekast effektivt.

Eitt øki, sum kann verða skipað betur, er almenna innkeypið. Ein máti at skipa tað betur er at áseta, at øll innkeyp oman fyri ávísa upphædd, til dømis 100.000 krónur, skulu skrásetast á einum innkeypsportali á alnótini og á henda hátt bjóðast út.

Ein slík skipan hevði tryggjað størri opinleika í almenna innkeypinum og økta kapping millum útbjóðararnar av vørum og tænastum til tað almenna. Økt kapping skuldi so aftur havt við sær betri prís og spardar skattakrónur. Týdningarmikil partur av hesum er, at við einari tílíkari skipan verða allir útbjóðarar javnsettir.

## Framhaldandi privatisering

Í dag hevur Føroya Landsstýri framvegis milliardir av krónum bundnar í almennum fyritøkum. Stórt spurnartekin kann setast við skynsemið í hesum. Hesar upphæddir kundu verið nýttar øðrvísi, serstakliga í hesum tíðum tá landið annars má taka lán fyri at gjalda hallið á fíggjarlógini. Týdningarmesta grundin til at privatisera almennu partafeløgini er tó, at váðin spjaðist munandi meira.

Sum støðan er í løtuni, metir Føroya Arbeiðsgevarafelag tó ikki, at tíðin at privatisera er hin rætta, og at rætt er at bíða til fíggjarkreppan er av, áðrenn av álvara verður farið undir at selja almennu fyritøkurnar. Hinvegin eigur at verða farið undir at fyrireika privatiseringina av fyritøkunum, so klárt er at selja, tá marknaðurin vísir seg at vera lagaligari. Tað er ikki longur nøkur orsøk til, at tað almenna luttekur beinleiðis í vinnulívinum. Veitingartrygdir av ymsum slag kunnu tryggjast á annan hátt.

Løgmansskrivstovan hevur latið úr hondum frágreiðing um at einskilja fyritøkur landsins. Sum heild tekur Føroya Arbeiðsgevarafelag undir við niðurstøðunum í frágreiðingini og mælir landsstýrinum til at fylgja tilmælunum. Frágreiðingin vísir eisini á trupulleikar við, at tað almenna rekur vinnuvirkir. Sagt verður, at landið eigur fyritøkur, sum virka í kappingarumhvørvi. Síðani stendur:

*"Privatu fyritøkurnar, kappast verður við, kenna kappingartrýstið frá almennu fyritøkunum sum kappingaravlagandi og órímiligt. Hinvegin kenna almennu fyritøkurnar tíðum eigaraviðurskiftini sum avmarkandi fyri møguleikar teirra at klára seg í kappingini. Hesi sjónarmið hjá einskildu og almennu fyritøkunum eru í andsøgn hvørt við annað, men geva tó greiða ábending um, at óheppin vinnupolitisk viðurskifti gera seg galdandi"*[1]

[1] Frágreiðing um at einskilja fyritøkur landsins, s. 7.

Landið eigur nógvar fyritøkur antin beinleiðis ella óbeinleiðis gjøgnum grunnar og feløg. Hetta samsvarar ikki við vinnupolitikkin. Í vinnupolitikkinum verður víst á, at altjóða rákið heilt greitt ber ímóti minni almennari stýring og fríari kapping.

Seinasta hálva árið hevur fíggjarkreppan elvt til, at stjórnir í fleiri londum hava lagt seg út í vinnulívið fyri at bjarga fyritøkum. Somuleiðis hevur verið neyðugt við m.a. bankapakkum. Føroya Arbeiðsgevarafelag metir hóast hetta ikki, at hetta er ein gongd leið í longdini. Tað almenna hevur til uppgávu at tryggja vinnunum ávísar støðugar karmar, so vinnan fær rúm, ræsur og frið at virka undir marknaðarbúskaparligum treytum.

Samanumtikið mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til:

- Avriks- og málstýring av øllum almennum stovnum
- Munandi útveiting av tænastuveitingar og hjálpifunktiónum
- Gerð av reglum fyri almenna innkeypinum
- Fyrireiking til framhaldandi privatisering

## Hallið á fíggjarlógini

Stórt hall er á fíggjarløgtingslógini í ár, og sum útlitini eru í løtuni, er væntandi enn størri hall komandi fíggjarár. Tá konjunkturarnir venda eigur hetta at broytast nakað, men roknast kann ikki við, at hallið verður burtur bara orsakað av konjunkturbroytingunum. Sum gongdin hevur verið seinnu árini, við munandi øktum almennum útreiðslum, væntar Føroya Arbeiðsgevarafelag, at framhaldandi hall verður á fíggjarlógini eisini eftir at búskapurin hevur vent. Umframt, at almennu útreiðslurnar eru nógv vaksnar, eru eisini strukturell viðurskifti, sum er orsøkin til hallið.

Skattainntøkur landsins koma fyri ein meginpart frá inntøkuskatti frá teimum A-inntøkum, sum føroyski arbeiðstakarin forvinnur. Partur av føroysku skattagjaldarunum fáa tó frádrátt í skattinum, tí hesi fáa sína inntøku úr serstakari vinnugrein - fiskivinnuni á sjónum -, sum stendur fyri einum stórum parti av lønarútgjaldingunum. Somuleiðis eru aðrar skipanir, so sum rentustuðulsskipanin til sethúsaskuld og mvg-frádrátturin til umvælingar og umbyggingar av sethúsum, við til at økja um strukturella hallið á fíggjarlógini.

## Skattapolitikkurin

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir tað vera óheppi, at allir partar av arbeiðsstyrkini ikki gjalda relativt tað sama í skatti. Hetta skapar ójavnvág í mun til, hvør skal gjalda fyri rakstrurin av samfelagnum. Somuleiðis er skipanin við til at avlaga kappingina um arbeiðsmegina í landinum. Tí eigur at vera farið undir eina tilgongd, har skattalættin til ávísar bólkar verður niðurlagaður. Hetta má gerast yvir eitt áramál, so grundarlagið ikki verður tikið undan vinnugreinini og teimum, sum starvast har. Hóskandi hevði verið at gjørt hesa tillaging yvir t.d. 10 ár.

## Eftirlønarskipan

Í hesum døgum verður arbeitt við at gera eina sokallaða eftirlønarnýskipan. Ásannandi, at tað verða alsamt fleiri eldri, og at hesi skulu hava eina virðuliga eftirlønaruppsparing, metir Føroya Arbeiðsgevarafelag tað vera uppá hægstu tíð, at slík nýskipan verður framd.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir samstundis til, at eftirlønarskipanirnar verða soleiðis lagdar til rættis, at tað verður lætt at bjóða seg fram sum eftirlønarveitara, so kapping verður tryggjað um eftirlønina. Kappingin tryggjar, at arbeiðstakarin fær sum mest burturúr uppsparingini. Somuleiðis verður mælt til, at skipanin verður gjørt umsitingarliga einføld fyri arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar umframt almenna myndugleikan, sum skal umsita og hava eftirlit við, at øll gjalda til eftirløn.

## Symmetri millum rentustuðulin og skatt av innistandandi

Rentustuðulin til sethúsalán er við til at skeikla kappingina um kapitalin. Rentustuðulin er 40 % til sethúsalán, meðan onnur lán ikki hava hendan møguleika. Skatting av innlánum er 35%. Sostatt er neyðugt fyri at javnseta innlán og útlán, at rentustuðulin til sethúsalán verður

lækkaður til 35%, meðan onnur lán somuleiðis kunnu trekkja 35% frá.

Ábendingar eru um, at ætlanin er at avtaka rentustuðulsskipanina, og at áramál skal setast á, nær stuðulsskipanin skal verða burtur. Um hetta verður gjørt, er umráðandi at hava í huga tey, sum undir verandi fortreytum nýliga hava sett búgv. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at landsstýrið setir ein arbeiðsbólk at arbeiða við, hvussu hetta kann gerast.

Um so er, at skipanin við rentustuðli verður avtikin, er týdningarmikið ikki at gera hetta uttan eina hóskandi tillagingartíð. Í fyrsta umfari eigur rentustuðulin at vera niðurlagaður til 35 % fyri at skapa symmetri millum rentustuðulin og skatt av innistandandi.

## Niðurlaging av frádrátti av mvg av handverkaralønum

Mvg-stuðulin til sethúsabygging var uppruna-liga ein frítøka fyri at gjalda mvg. Endamálið við frítøkuni var at stuðla byggvirkseminum í eini tíð, tá lítið virksemi var í samfelagnum.

Eins og flestu frádráttir og stuðlar virkar mvg-stuðulin avlagandi. Seinastu nógvu árini við stórum virksemi hevur hesin stuðul eggjað til meira virksemi í eini tíð, tá tørvur var á at tálma virkseminum. Mett verður, at tíðin nú er tann rætta at fara undir at endurskoða hesa stuðuls-skipan. Tað er ikki rætt, at avtaka hesa skipan beint nú uttan ávaring, tí eftirspurningurin er sera lágur og virksemið hareftir, men Føroya Arbeiðsgevarafelag metir, at hesin stuðul skal líðandi avtakast. Verður henda avgerð tikin, kann roknast við størri virksemi í fyrsta umfari, tí fólk fara at brúka stuðulsmøguleikan, áðrenn hann verður tikin av og er tað tiltrongt í hesum døgum.

Samanumtikið mælir Føroya Arbeiðsgevara-felag til:

- at skattafrádrátturin til fiskimenn verður niðurlagaður t.d. yvir 10 ár
- at eftirlønarnýskipanin verður gjøgnum-førd sum skjótast.
- at symmetri verður millum rentu-stuðul og skatt av innlánum
- at mvg-frádrátturin til sethúsabygging verður niðurlagaður.

## *Fiskivinnan á einum vegamóti*

Føroyska fiskivinnan er illa fyri og á einum vegamóti. Flestu skipabólkar hava torført við at fáa endarnar at røkka saman, og framleiðsluvinnan á landi hevur somuleiðis havt fleiri fíggjarliga tung ár.

Seinasta árið ella so hava fiskaprísirnir verið serstakliga lágir, og tað sær út til at hava tikið grundarlagið undir stórum pørtum av flotanum. Árini frammanundan hava fiskaprísirnir verið javnt góðir, men hetta hevur tó ikki verið nóg mikið til, at vinnan hevur konsoliderað seg og soleiðis vera fíggjarliga sterk til at klára eitt ár við vánaligum prísum. Sum støðan er, og hevur verið í fleiri ár, er ikki annað at siga, enn at skipanin fyri føroyska fiskivinnu als ikki er fíggjarliga haldfør.

Lívfrøðiliga sær ikki mætari út. Ávaringarnar frá fiskifrøðingum hava ljóðað í fleiri ár, men valt hevur verið ikki at lurta eftir teimum í nóg stóran mun. At fiskiskapurin eftir týdningarmiklum fiskasløgum nærum er farin burtur í einki er tó ein sannroynd og ein viðvirkandi orsøk til, at torført er at fáa endarnar at røkka saman í vinnuni.

Um hugt verður eftir fiskiskapinum undir Føroyum yvir longri áramál sæst, at úrtøkan sveiggjar nógv. Summi ár er fiskiskapurin heilt góður og liggur væl omanfyri tað, sum mett verður, at grunnarnir undir Føroyum kasta av sær. Onnur tíðarskeið er fiskiskapurin væl minni, enn mett verður, at grunnarnir kunnu kasta av sær, um vinnan verður burðardygt umsitin. Hetta ger, at fiskivinnan verður ávirkað av sera stórum sveiggjum í úrtøkuni, og tá so eitt ógvusligt prísfall, sum hevur verið at sæð seinasta hálva árið, kemur, so klárar vinnan ikki at standa ímóti, tí hon er ov illa fyri fíggjarliga.

Um hugt verður eftir fiskiskapinum undir Føroyum eftir trimum teimum týdningarmiklastu fiskasløgunum sæst, hvussu sveiggini hava verið. Serliga er tað toskurin, sum hevur stór sveiggj, meðan fiskiskapurin eftir hýsu vísir seg at vera eitt sindur javnari. Um hugt verður eftir teimum seinastu árunum sæst, at toskafiskiskapurin er minkaður seks ár á rað og hýsufiskiskapurin fimm ár á rað. Upsafiskiskapurin er yvirhøvur bara vaksin seinnu árini, tó so har hava sveiggj eisini verið.

Toskurin, sum er kostnaðarmiklasta fiskaslagið saman við hýsuni, er vanliga álitið hjá húkaflotanum, sum nú liggur á knøunum. Vánaliga umsitingin av fiskastovnunum er viðvirkandi til, at fíggjarligu úrslitini eru so vánalig. Sjálvt um hetta er so, hevur veiðuliðið ógvuliga torført við at viðurkenna, at ov stór veiðuorka er inni í flotanum.

Marknaðarrákið seinnu árini hevur verið, at evropisku innkeypararnir av fiskavørum í alt størri mun eftirspyrja eina skjalprógving av, at fiskurin, teir keypa, er frá einum lívfrøðiliga burðardygt umsitnum fiskastovni. Hesi skjalprógv klárar føroyska útflutningsvinnan ikki at bera fram. Vandi er tí fyri, at føroyskar fiskavørur ikki í sama mun sum fiskavørur frá øðrum londum, har burðardygdin kann skjalprógvast, eru kappingarførar, og at føroyskir veitarar tí ikki standa seg í kappingini um bestu keypararnar. Hetta merkja m.a. tey, sum útflyta upsa til evropiska marknaðin, nú partur av norska upsanum hevur fingið merki sum burðardyggur frá felagnum Marine Stewardsship Counsil (MSC).

Felagið Nótaskip ætlar sær eisini leiðina við at fáa umhvørvisgóðkent pelagiska fiskiskapin hjá limunum í felagnum. Hetta verður gjørt, tí limirnir í felagnum hava gjørt sær greitt, at hetta má gerast, um vørurnar skulu kunna seljast til sama marknað og sama prís, sum vørurnar hjá kappingarneytunum á marknaðinum.

Hetta er ikki ein støða, sum føroyska fiskivinnan tolir. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at vinna og myndugleikar seta seg saman fyri at semjast um, hvussu føroyska fiskivinnan skal umsitast, soleiðis at til ber til eina og hvørja tíð at fáa sum mest burturúr tí tilfeingi, sum er.

Fyri stuttum frættist, at húkaflotin hevur søkt landsstýrið um at fáa stuðul næstu árini, tí annars hórar húkaflotin ikki undan. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir staðiliga frá, at studningur verður veittur vinnuni, eisini húkaflotanum. Húkaflotin hevur brúk fyri at gerast

minni, og sjálvt um hetta verður ein  svár til-gongd hjá nógvum, er hetta ein máti at fáa lønsemi í vinnuna og eitt minni veiðutrýst á grunnarnar. Verður konkurslógin sett úr gildi og studningur veittur vinnuni, verður tað einki minni enn ein vanlukka.

Um tikið verður samanum kann sigast, at tað eru stórar avgerðir fyri framman fyri føroyskari fiskivinnu. Politiskt má man seta sær ætlanir og mál fyri, hvussu føroyska samfelagið skal gagn-nýta tilfeingið framyvir.  Føroya Arbeiðsgevara-felag mælir tí til, at ein nýggjur fiskivinnu-politikkur verður gjørdur. Fiskivinnupoli-tikkurin skal bróta upp úr nýggjum, og enda-málið má verða at fáa eina fiskivinnu, sum fíggjarliga og lívfrøðiliga er burðardygg. Nýggi fiskivinnupolitikkurin eigur at hava sum høvuðsendamál, at fiskivinnan skal vinna pening.

Tilfeingið í havinum kring Føroyar skal umsitast á slíkan hátt, at tað kemur føroyska samfelagnum til góðar á bestan hátt. Besti háttur at gera hetta er at leggja soleiðis til rættis, at vinnan vinnur pening. Vunnin peningur gevur avkast til landskassan, tryggjar menning av vinnugreinini og sostatt av kappingarførleikanum hjá okkara útflutnings-vinnu.

Samanumtikið mælir Føroya Arbeiðsgevara-felag til:

- at nýggjur føroyskur fiskivinnupoli-tikkur, sum brýtur upp úr nýggjum, verður gjørdur
- at fiskivinnupolitikkurin tryggjar, at fiskivinnan gerst fíggjarliga burðardygg
- at fiskivinnupolitikkurin tryggjar, at fiskivinnan gerst lívfrøðiliga burðar-dygg
- at tað ikki verður farið undir at geva studning til fiskivinnuna




*Mynd 3. Fiskiskapurin eftir toski, hýsu og upsa 1993-2008 (www.hagstova.fo)*

## *Fokus á orkunýtslu*

Føroya Arbeiðsgevarafelag setti á sumri 2008 ein strategibólk at arbeiða við orku og umhvørvisspurningum. Bólkurin kom við tilmælum til, hvussu orkunýtslan og harvið $CO_2$ útlátið hjá Føroyum kann minka. Føroya Arbeiðsgevarafelag ásannar, at føroysk vinna sum heild er sera bundin at olju sum orkukeldu, og at henda sannroynd er ein tann størsta avbjóðingin vinnan hevur. Ásannandi, at útlit eru fyri, at oljuprísurin í framtíðini allarhelst fer at sveiggja enn meira, heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað er umráðandi, at vinnan og myndugleikarnar gera sær greitt, hvønn týdning orka hevur í ymiskum vinnugreinum, og hvussu orkunýtslan og $CO_2$-útlátið kunnu minkast á ein hátt, so vinnan kann skapa grundarlag fyri tryggum og høgum livistøði í Føroyum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við tilmælunum frá strategibólkinum. Hetta er grundað á, at kappingarførið hjá føroyskum vinnulívi gerst betri, um útreiðslurnar til orku minka. Tá oljunýtslan í Føroyum er stór, hevur oljuprísurin ein avgerandi leiklut. Sveiggj – og stundum óvanliga høgur oljuprísur – hótta og geva eina óstøðuga vinnu. Tá oljunýtslan minkar, verður vinnan meira óheft av oljuprísinum og hevur eitt meira støðugt grundarlag. Tí verður mælt til, at føroysk virki, stovnar og húsarhald gera allar tær orkusparingar, ið loysa seg.

Føroyar koma at leggja seg undir stórar minkingar av $CO_2$-útlátinum. Hetta verður væntandi avrátt í millumtjóða ST-avtalu í Keypmannahavn í 2009. Neyvt samsvar er millum oljunýtsluna og útlát av $CO_2$. Tað er orsøkin til, at hesi viðurskifti hava so stóran týdning fyri vinnu og samfelag okkara.

Føroyskir myndugleikar mugu taka tey stig, sum eru neyðug fyri, at vit kunnu lúka tey krøv, sum verða sett í millumtjóða ST-avtaluna í Keypmannahavn í 2009. Tað snýr seg um yvirskipaðar avgerðir, ið skulu til fyri at røkka á mál.

Í hesum sambandi skulu eisini forðingar fyri orkusparingum í m.a. lógum og reglugerðum beinast av vegnum.

Vit eiga ikki at ivast í, at alt fleiri keyparar fara at krevja skjalprógv fyri t.d. orkunýtslu og $CO_2$ útlát fylgir við vøruni. Kunnu føroyskar vørur skjalprógva eitt lágt $CO_2$-útlát, so kunnu vit gerast sterkari á marknaðinum. Tað kann gerast ein avgerandi liður í føroyskari marknaðarføring uttanlands.

Allar fyritøkur kunnu spara orku, men tað er ymiskt, hvat skal til fyri, at tað verður gjørt, og hvussu nógv kann sparast við vinningi. Mælt verður tí til, at eitt Orkuráð verður skipað við serkønum og umboðum fyri tað almenna eins og vinnu. Endamálið er at elva til orkusparingar hjá tí almenna, hjá privatum og hjá vinnuni. Orkuráðið skal veita ráðgeving, tá talan er um orkusparing, og gera bindandi avtalur við fyritøkur, so at tær gera íløgur á økjum, sum geva munandi orkusparingar, og tí rinda seg sjálvar aftur. Orkuráðið skal eisini geva almenna kunning um orku og mæla til, hvørji politisk tiltøk skulu setast í verk, so at vit røkka tey mál, ið vit seta okkum í sambandi við orkusparing og $CO_2$-minking. Vinnan eigur ein natúrligan leiklut í Orkuráðnum fyri at tryggja, at tiltøkini ikki leggja óneyðugar byrðar á vinnuna.

Fiskivinnan er høvuðsvinnan og hevur serligar avbjóðingar, tí orkunýtslan er so stórur partur av samlaða kostnaðinum í hesi vinnu. Skal lønsemi vera í fiskivinnuni, so verður neyðugt at minka munandi um orkunýtsluna. Verandi lóg um vinnuligan fiskiskap forðar fyri, at neyðugar tillagingar kunnu gerast; umsitingin hevur elvt til, at orkunýtslan er økt. Tað er umráðandi, at skipanin gevur vinnuni frælsi at velja tann mest lønsama raksturin. Tá er m.a. talan um frælsi at velja tey minst orkukrevjandi og mest produktivu fiskiførini.

Um forðað verður fyri, at vinnan kann tillaga seg, verða óproduktivar fyritøkur á marknaðinum, sum ikki bera seg uttan rakstrarstuðul. Tær skapa ikki nóg stór virði. Tilfeingið skal tí heldur brúkast aðrastaðni, og skal sostatt hava loyvi at rýma. Tí er sera umráðandi, at rakstrarstuðul ikki kemur uppá tal her.

Føroyska samfelagið nýtir alt ov nógva orku til upphiting. Ein orsøk er, at krøvini til bjálving av bygningum ikki eru dagførd. Harafturat er

vitanin um bjálving av bygningum í Føroyum ikki nøktandi. Tí er umráðandi, at landsbyggireglugerð verður gjørd, og at krøv verða sett til orkulýsing av bygningum, so íløgur kunnu gerast fyri at minka um orkutørvin. Við síni støðu sum myndugleiki, byggiharri og leigari kann tað almenna ganga undan saman við vinnuni – til fyrimuns fyri alt samfelagið.

Vinnan kann gera nógv sjálv fyri at spara orku, men tað er umráðandi, at yvirskipaðar politiskar avgerðir verða tiknar í sambandi við orkusparingar og orkuveiting. Víst verður til frágreiðingina Orka og umhvørvið, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag lat úr hondum fyrr í ár.

**Tilmæli**:
Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til:

- at Orkuráð verður stovnað og herundir tekur støðu til:
    - orkuveiting og fjarhitaskipan í øllum nýggjum útstykkingum og í sambandi við stórar bygningar, ið kunnu verða grundarlag fyri fjarhitanetum
    - at samhugsa stóru netbundnu orkuveitingarskipanirnar og veitararnar, soleiðis at sum mest fæst burtur úr samlaða orkutilfeinginum á ein umhvørvisvinarligan og kostnaðarvirknan hátt.
- at føroyska lóggáva og skipanir annars verður dagført, soleiðis at hesi ikki eru viðvirkandi orsøk til, at orkunýtslan er størri enn neyðugt, herundir
    - at føroysk lóggáva forðar fyri, at vørur, sum ikki eru loyvdar á t.d. ES marknaðinum, verða seldar í Føroyum
    - at skipanir verða gjørdar, so eisini leigubygningar verða væl bjálvaðir
    - at orkusýn verður kravt í sambandi við sølu av húsum. Orkunýtslan í øllum húsum eigur at verða kannað. Tá verður møguligt at mæla til skilagóðar og lønsamar íløgur
    - og at forðingar í tí almennu fíggjarstýringini og játtanar-reglunum verða tiknar burtur, soleiðis at minkanin av orkunýtsluni verður sett í fokus.
- At tað fyri fiskivinnuna verður skipað soleiðis fyri, at lunnar verða lagdir undir eina skipan, har minst møgulig orka verður brúkt til fiskiskapin, herundir
    - at allir manningarsáttmálar verða broyttir soleiðis, at manningin luttekur í oljuútreiðslunum
    - at allar forðingar verða tiknar burtur, soleiðis at fiskivinnan á sjógvi fær frælsi at velja ein skilagóðan og lønsaman rakstur
    - at komandi tillagingar í fiskidagaskipanini verða gjørdar við tí í huga, at tær sum mest eggja skipum at brúka sum minst av olju fyri hvørt veitt tons av fiski.
    - at broyta uppmátingarháttin av skipum, so tey hava orkubetri snið og at menna og nýta tøkni, ið kann optimera driftina av skipunum.
- Mælt verður til, at flogvallarviðurskiftini verða betraði beinanvegin, soleiðis at reglusemi kann betrast munandi og størri flogfør kunnu takast í nýtslu.
- Mælt verður til, at meiri peningur verður brúktur til gransking og menning í samstarvi við vinnuna.
- Mælt verður til, at boðað verður frá longu nú, at ein komandi oljuvinna sjálv skal rinda kostnaðin av antin at binda $CO_2$ ella keypa $CO_2$-kredittir á altjóða marknaðinum.

# MÁL í 2008

Í hesum partinum verða nevnd yvirskipaði mál, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið partur av.

## *Mál, sum vórðu avgreidd í 2008 og higartil í 2009*

- Havnar Arbeiðsgevarafelag varð í september lagt saman við Føroya Arbeiðsgevarafelag. Nevndin í Havnar Arbeiðsgevarafelag metti, at tíðin var farin frá at hava eitt lokalfelag fyri Havnina, tí at virksemi felagsins varð í stóran mun umsitið av Føroya Arbeiðsgevarafelag. Limir Havnar Arbeiðsgevarafelags eru sostatt nú beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum tekur undir við avgerð Havnar Arbeiðsgevarafelags, og hevur yvirtikið allar ognir og skyldur frá felagnum.
- Roknskapar- og partafelagslógirnar vórðu dagførdar í 2008. Lógirnar eru nú skipaðar soleiðis, at tað eru í tráð við altjóða, einamest ES, reglur. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við hesum broytingum, og hevur gjørt vart við, at tað er av stórum týdningi, at hesar lógir verða dagførdar, soleiðis at samsvar verður verandi millum føroyska lóggávu og lóggávu í londunum kring okkum.
- Føroyar fingu sína fyrstu marknaðarføringslóg 1. januar 2009. Endamálið við lógini er at tryggja, at fyritøkur sínamillum og í mun til brúkarin halda góðan marknaðarføringssið. Lógin ásetur m.a., at tað skal gerast greitt fyri brúkaranum, at ein lýsing er ein lýsing og ikki ein grein ella ein søga. Lógin ásetur somuleiðis, at brúkarin undan einum keypi skal vita, hvør veruligi prísurin fyri vøruna er.

  Lýsingar til almenningin, so sum blaðlýsingar, plakatir, lýsingarbløð, standarar v.m., skulu vera á føroyskum. Upplýsandi tilfar, t.d. vegleiðingar, sum verða latnar brúkarinum persónliga, kemur ikki undir "lýsingar" sambært marknaðarføringlógini, og nýtast hesar sostatt ikki at vera á føroyskum. Harafturat eru millum annað ásetingar um villleiðandi ella niðrandi marknaðarføring, um beinleiðis marknaðarføring og um marknaðarføring mótvegis børnum og ungum. Brúkaraumboð er sett at umsita lógina. Brúkaraumboðið skal hava eftirlit við lógini, umframt hjálpa og vegleiða fyritøkum.
- Nýggj Arbeiðsskaðatryggingarlóg hevur verið leingi ávegis og varð samtykt á tingið í mai. Umframt dagføringar í verandi lóg eru eisini komnar inn nýggjar ásetingar um vinnusjúkur, tvs. sjúkur, sum ikki eru brádliga íkomnar, men yvir eitt longri tíðarskeið. At hetta, hóast Føroya Arbeiðsgevarafelag var ímóti, er komið inn í lógina merkir, at arbeiðsgevarar fyri vinnusjúkur skulu gjalda 0,10% av útgoldnari løn í ein grunn, sum skal svara fyri vinnusjúkum. Vinnusjúkur verða góðkendar sum slíkar sambært kunngerð, sum verður gjørd eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum.
- Løgtingið samtykti 14. mai 2009 einmælt umfatandi broytingar í ALS-lógini. Lógin er **ikki** komin í gildi enn, men fær gildi dagin eftir, at hon er lýst í Kunngerðarsavninum. Broytingarnar hava m.a. til endamáls at fáa ALS at virka sum eina veruliga tryggingar-skipan, at hjálpa arbeiðsleysum skjótari aftur á arbeiðsmarknaðin, at tryggja eitt rættvísari útrokningar-grundarlag í fiskavirkisskipanini og at lata ALS-skipanina upp fyri fiskimonnum og útisiglarum. Ein av mongu broytingunum er, at útrokningargrundarlagið verður 80% av móttiknu A-inntøkuni síðstu 12 mánaðirnar, tó so at útgjaldið í mesta lagi kann vera kr. 20.000.
- Hin 1. januar 2009 kom nýggj lóg um Føroya Altjóða Skipaskráseting (FAS) í gildi. Í sambandi við nýggju lóggávuna hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag umvegis Reiðarafelagið fyri Farmaskip havt góðan møguleika at gera vart við síni sjónarmið. Millum annað hetta var eisini endamálið

við frágreiðingini um FAS, sum feløgini stóðu fyri í fjør. Vinnan er væl nøgd við nýggju lógina, og nú eru eisini tekin um, at tað fer at eydnast at fáa fleiri útlendsk reiðarí at skráseta skip í FAS.

- Samráðingar hava eina tíð verið um, at Føroyar gerast partur av loftferðslupakkanum hjá ES. Semja er sum so gjørd við ES um, hvussu Føroyar skulu gerast partur av loftferðslu-pakkanum hjá ES (ECAA), soleiðis at Føroyar fáa rættindini sum partnaraland. Enn eru seinastu góðkenningarmannagongdirnar ikki lidnar, men tá hesin sáttmálin er komin uppá pláss, fær føroysk flogferðsla og evropisk flogferðsla annars javnbjóðis møgu-leikar bæði í føroyskum og í EBS øki.
- Nýggj alilóg var samtykt í vár. Føroya Havbúnaðarfelag hevur seinastu tvey árini luttikið í einum arbeiðsbólki, sum hevur endurskoða alilóggávuna. Nýggja alilógin er nú samtykt í Løg-tinginum. Broytingarnar eru umfatandi og landsstýrismaðurin fær víðar heimildir at regulera alivinnuna við. Hetta er m.a. heimild til at áseta tøknilig krøv til aliútgerðina alt eftir, hvussu útsett og streymhart, tað er á aliøkinum. Harafturat er eisini tann broyting, at ognarparturin av samlaða talinum av aliloyvinum, sum ein einstakur kann eiga, er øktur frá 25% til 50%.

## *Mál, sum ikki eru loyst, og onnur mál*

- Í fleiri ár hevur verið arbeitt við einum eftirlønarreformi, sum skal føra við sær, at tvungin eftirlønaruppsparing verður sett í verk fyri allar føroyingar. Tað sær nú út til, at uppskot um hetta verður lagt fyri tingið í komandi tingsetu, og Føroya Arbeiðsgevarafelag fylgir sjálvandi við gongdini viðvíkjandi hesum.
- Nakað hevur verið arbeitt við at fáa lógávu, sum ger at tað ber til at lata fyritøkuveð í Føroyum. Líknandi skipanir eru í londunum kring okkum, men enn er eingin semja um slíka skipan í Føroyum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur sent Innlendismálaráðnum fyri-spurning um hetta mál. Seinast vit frættu, verður arbeitt við at fáa føroyska lóggávu dagførda, soleiðis at møguligt verður at geva fyritøkuveð.
- Nýggj matvørulóg varð løgd fyri tingið í farnu setu, men varð ikki liðugt viðgjørd, áðrenn setan endaði. Uppskotið fall tí burtur, men verður væntandi lagt fram aftur í komandi tingsetu. Vinnan hevur gjørt sínar viðmerkingar til uppskotið, og vónar at hetta verður samtykt í heyst.
- Nú búskaparligar avbjóðingar raka landskassan meint sær út til, at tað av politisku skipanini verður hildið at vera ein gongd leið at lata vinnuna gjalda ein part av undirskotinum umvegis hækkaði gjøld. Onkur gjøld, t.d. tinglýsingargjaldið, hava sera stóra ávirkan á ávísar partar av vinnuni, men eisini fleiri smærri gjøld eru hækkaði, og hava hesi tilsamans ávirkan á úrslitið í vinnuni, sum í forvegin eisini merkir fíggjarligu niðurgangstíðirnar. Fylgt verður við hesi gongd, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag metir vera sera óhepna.
- Í sambandi við at íslendska krónan í heyst lækkaði sera nógv, hava íslendskar fyritøkur bjóða uppá og fingið uppgávur í Føroyum. Hetta hevði við sær nakað av hóvastáki í heyst, tí at íslendsku lønirnar eru lægri enn føroysku lønirnar, tá kursmunurin verður tikin við. Samstundis sum Føroya Arbeiðsgevarafelag sær tað sum eina av sínum fremstu uppgávum at tryggja, at skipaði viðurskiftir eru á føroyska arbeiðsmarknaðinum, verður eisini hildið fast við, at kapping millum fyritøkur, tað verið seg útlendskar ella føroyskar, til eina og hvørja tíð, fer fram undir javnbjóðis treytum. Tað hevur alstóran týdning, at tilboð uppá arbeiði í Føroyum byggja á tær lønir og setanartreytir annars, sum eru avtalaðar á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Tað er tí at fegnast um, at landsstýrismaðurin í Vinnumálum tók stig til, at hetta var gjørt, samstundis sum atlit vórðu tikin til siðvenjuna higartil á arbeiðsmarknaðinum.

- Rumbul spurdist burturúr, tá landsstýrismaðurin í vinnumálum, Jóhan Dahl, kunngjørdi, at hann fór at hækka tali av nevndarlimum í almennum partafelag, soleiðis at lutfallið millum privatu íleggjarar-nar og almenna íleggjarin broyttist.

  Uttan at taka dagar ímillum, hvør hevði rætt ella skeivt í teimum tvídráttum, sum tóku seg upp, so metir Føroya Arbeiðsgevarafelag tað vera av alstórum týdningi, at álit er millum partarnar.

  Privatu íleggjararnir – bæði føroyskir og útlendskir, sum tóku av tilboðnum um at keypa, vístu fyritøkunum, landsins leiðslu og Føroyum álit. Álitið varð ítøkiliga grundað á ta einskiljingartilgongd, sum Løgtingið hevði samtykt og tær fyritreytir, sum seljarin kunnaði um. Men harafturat hava íleggjararnir eisini grundað sítt álit á, at Føroyar fóru at virða sínar nýggju samstarvsfelagar eftir vanligum íløgusiði fyri fyritøkur skrásettar á keypskálum í vesturheiminum.

- Fyrr í ár boðaði landsstýrismaðurin í uttanríkismálum frá, at SamVit, sum bert hevði tvey ár á baki, skuldi leggjast beinleiðis inn undir Uttanríkisráðið. Kenda millumliðið millum vinnuna og almennu skipanina er sostatt ikki til longur.

  Uppgávurnar hjá SamVit vóru á leið tær somu sum uppgávurnar, sum Menningarstovan og Ferðaráðið høvdu. Tiltøkini, sum SamVit hevur staðið fyri saman við vinnuni, sum t.d. luttøka á framsýningum uttanlands, er framvegis ein týdningarmikil uppgáva, sum skal loysast. Somuleiðis marknaðarføringin av Føroyum sum ferðavinnuland og ikki minst menningin av ferðavinnuni innlendis í Føroyum.

  Greitt er, at ferðavinnuparturin verður lagdur inn í serstaka deild, sum fær heiti Visit Faroe Islands. At ferðavinnan á henda hátt fær eina greiðari vangamynd er gott, men tað er av stórum týdningi, at tær uppgávur fyri restina av vinnuni, sum SamVit hevur loyst, ikki detta á gólvið. Føroya Arbeiðsgevarafelag heitti tískil á Uttanríkisráðið um at bera so í bandi, at vinnuáhugamál verða tryggjaði í framhaldandi tilgongdini við samanlegging av SamVit við Uttanríkisráðnum. Um hetta verður rokkið við tí bygnaði, sum nú er gjørdur er ikki greitt, men okkara vón er, at so er.

# *Frágreiðingar*

## Orka og umhvørvið

Føroya Arbeiðsgevarafelag gav í januar 2009 sítt íkast til kjakið um, hvussu føroyingar skulu minka um orkunýtsluna og sostatt $CO_2$ útlátið.

Á vári 2008 skipaði Vinnuhúsið saman við Bitland og øðrum fyri veðurlagsráðstevnuni TACC. Hetta varð gjørt fyri at fáa lýst, hvørja ávirkan $CO_2$-útlátið hevur á veðurlagið, og hvørjar avleiðingar talan er um á okkara leiðum.

Eftir kjakið, sum stóðst eftir veðurlagsráðstevnuna, avgjørdi Føroya Arbeiðsgevara-felag, at tað er neyðugt, at hesi viðurskifti verða lýst út frá einum vinnuligum sjónarhorni. Fyri føroyska vinnu er tað sera týdningarmikið, at orkunýtslan í Føroyum er so skinsom sum gjørligt, hetta tí, at kappingarevnini hjá føroyskum fyritøkum eru tengd at hesum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag setti tí ein strategibólk at arbeiða við orku og umhvørvisspurningum, og er hesin bólkur komin við sínum tilmælum. Í strategibólkinum sótu: Bergur Poulsen, Havsbrún; Magni Arge, Atlantic Airways; Johnny í Grótinum, Føroya Banki; Viberg Sørensen, Føroya Reiðarafelag; Joel undir Leitinum, Samskip; Hákun Djurhuus, SEV; Árni Jakobsen, SMJ og Marita Rasmussen, Vinnuhúsið. Steinbjørn í Dali og Vilhjálmur Nielsen frá Bitland hava verið skrivarar hjá bólkinum.

Niðurstøðurnar frá strategibólkinum eru lýstar longur frammi í ársfrágreiðingini.

## Kanning av motivatiónsfaktorum

Í tíðini við sera avmarkaðum arbeiðsloysi og stórum tørvi á arbeiðsfólki, sá tað út til, at arbeiðsgevarar fyri at trekkja arbeiðsmegi til sín í stóran mun nýttu lønina sum kappingar-element. Spurningurin varð so settur, um hetta

gjørdi mun, og hvat tað er, sum motiverar starvsfólk, og fær tey at støðast. Hetta var orsøkin til, at Vinnuhúsið í seinnu helvt av november 2007 vendi sær til Granskingardepilin fyri samfelagsmenning fyri at fáa gjørt eina kanning av, hvat motiverar arbeiðsfólk. Eina kanning, har tað bar til at samanbera úrslitini við tilsvarandi kanningar í eitt nú Íslandi, Danmark og Noregi.

Januar 2008 varð avtala gjørd um spurnablaðskanning og frágreiðing. Ein stýringsbólkur varð settur av Vinnuhúsinum at ráðgeva í samband við við gerð av spurnarblaði, rapportering og framløgu av frágreiðing. Í stýringsbólkinum hava hesi sitið: Bergur Poulsen, Marita Rasmussen og Esther Dahl.

Valt varð at gera kanningina millum løntakarar innan privata arbeiðsmarknaðin á landi, tvs. millum starvsfólk hjá limum Føroya Arbeiðsgevarafelags á landi.

Ynskiligt hevði verið, at tað hevði borið til at samanborið við aðrar partar av føroyska arbeiðsmarknaðinum sum eitt nú almenna arbeiðsmarknaðin ella arbeiðsmarknaðin á sjónum, men tað hevur ikki verið gjørligt, av tí at tilsvarandi kanningar enn ikki eru gjørdar á hesum økjum.

Motivatiónskanningin verður almannakunngjørd seinni í juni-mánaða 2009.

# Sáttmálaviðurskifti og føroyski arbeiðsmarknaðurin

## *Sáttmálasamráðingar í 2008 og 2009*

Grundarlagið undir sáttmálasamráðingunum í 2008 og 2009 varð lagt við samráðingunum við arbeiðarafeløgini í 2007. Sáttmálarnir, sum tá vórðu gjørdir við arbeiðarafeløgini, eru galdandi inntil 1. mai 2010.

Í teimum semjum, sum eru gjørdar aftaná semjuna við arbeiðarafeløgini, hevur hevur eydnast at hildið sama kostnaðarstøði, sum varð ásett við arbeiðarafeløgini, og sum soleiðis hevur verið útreiðslukarmurin fyri hesa samráðingarrunduna.

## Manningarfeløgini á sjónum

Reiðarafelagið fyri Farmaskip gjørdi í 2008 bert ein 1-ára sáttmála við manningarfeløgini. Hetta var orsakað av, at broytingar í FAS-skipanini lógu fyri framman og kundu væntast at ávirka lønarskipanina í verandi sáttmálum.

Nýggju og broyttu reglurnar fyri FAS komu í gildið 1. januar 2009 og merktu m.a. at skattaprosentið hjá manning undir FAS varð ásett til 35%.

Sáttmálarnir, sum gjørdir vóru í 2008, gingu út 1. mars. Samráðingarnar um nýggja sáttmála vórðu í fyrstu syftu millum RFF øðrumegin og tey trý manningarfeløgini hinumegin. Tað bar tó ikki á mál at gera eina felags semju, so 18. mars undirskrivaðu RFF, Føroya Skipara-og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Motorpassarafelagið semju uttan Føroya Fiskimannafelag.

Orsøkin til, at samráðingar við Føroya Fiskimannafelag drógu út, var, at serliga hesin fakbólkurin, sum var raktur av fastfrysta skattaprosentinum, og fleiri av limum Føroya Fiskimannafelags fóru upp í skatti. Nátt varð tó á mál við Føroya Fiskimannafelag 8. apríl, tá semja varð undirskrivað.

Nýggju sáttmálarnir verða galdandi fyri tvey ár, tvs. inntil 1. mars 2011. Semjurnar hava í høvuðsheitum við sær, at karmurin fyri lønarhækkingina verður 6,44 % fyri tíðarskeiðið. Fleiri broytingar eru gjørdar í sáttmálunum, sum

eru tengdar at FAS-broytingunum. Hesar broytingar eru tó neutralar í mun til yvirskipaða lønarkarmin.

Eisini hevði semjan við sær, at sersáttmálin fyri Norrønu fellur burtur á tann hátt, at viðkomandi sáttmálaásetingar verður fluttar inn í høvuðssáttmálan.

## Manningarfeløgini í luftini

Hetta farna árið hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag yvirtikið tríggjar sáttmálar við fakfeløg innan tann partin av vinnuni, sum virkar í luftini. Hesi fakfeløgini eru AAF (Atlantic Airways Flogskiparar), Felagið av Grækarismessu 2008 (flogmekanikarar) og Súlan (kabinustarvsfólk).

Sáttmálar vóru longu galdandi fyri flogskiparar og flogmekanikarar, men hesir eru nú yvirtiknir av Føroya Arbeiðsgevarafelag, og tað verður sostatt Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum framyvir fer at hava ábyrgdina av sáttmálasamráðingunum á hesum sáttmálaøkjunum. Sáttmálin fyri flogmekanikarar varð yvirtikin 2. juni 2008 og gongur út 1. oktober 2010. Sáttmálin fyri flogskiparar varð yvirtikin 30. apríl 2009 og gongur út 31. mars 2010.

Fakfelagið Súlan er nýstovnað felag fyri kabinu-starvsfólk og heitti fyrr í ár á Føroya Arbeiðs-gevarafelag um at taka upp sáttmálasamráðingar. Hetta øki hevur ikki fyrr verið fevnt av sáttmála undir Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Partarnir skrivaðu undir sáttmála 11. november 2008, og er sáttmálin galdandi frá 1. november 2008 til 1. november 2010. Lønarhækkingarnar í hesum sáttmálanum, í mun til lønirnar, sum vóru galdandi áðrenn sáttmálan, eru á sama støði, sum teir sáttmálar Føroya Arbeiðsgevarafelag annars hevur gjørt í hesi samráðingarrunduni.

## Sáttmálasamráðingar fyri framman

Eingin av sáttmálunum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag varar av, gongur út, tað sum eftir er av 2009. Tó ganga sáttmálarnir fyri Føroya Tele og Postverk Føroya, sum gjørdir eru við Starvsmannafelagið út 1. januar 2010. Samráðingarnar um hesar sáttmálar byrja sostatt á heysti í ár.

Nýggja samráðingarrundan byrjar 1. mai 2010, tá sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini ganga út.

# Tiltøk 2008

## Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag á vitjan í Brússel

Í døgunum 8. – 10. oktober 2008 var nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag í Brússel og kunnaði seg um EFTA, EBS og ES. Henda kunningarferð er komin í lag, ásannandi, at Føroya tilknýtið til Evropa verður eitt mál til umrøðu komandi tíðina.

Vitjað varð á EFTA-skrivstovuni í Brússel, har nevndin varð kunnað um EFTA sum felagsskap, um arbeiðið hjá EFTA, og hvørjar møguleikar Føroyar hava at gerast partur av EFTA. Somuleiðis varð vitjað á føroysku sendistovuni í Brússel og á norsku og íslendsku sendistovunum.

Norsku og íslendsku arbeiðsgevarafeløgini eru eisini umboðaði í Brússel. Bæði feløgini eru limur í BuisnessEurope, sum er evropiska meginfelagið fyri arbeiðsgevarafeløg. Áhugavert var at hoyra um, hvørja støðu norska og íslendska arbeiðsgevarafelagið hava til teirra tilknýtið til ES og um, á hvønn hátt tey meta seg hava ávirkan á tey mál, sum verða við-gjørd í ES høpi.

Eftir vitjanina segði Føroya Arbeiðsgevarafelag soleiðis í tíðindaskrivi:

*"Tað er av alstórum týdningi fyri eitt kjak um framtíðar støðu Føroya í mun til antin EFTA ella ES, at eitt grundarlag, sum objektivt lýsir viðurskiftini, verður gjørt. Heruppií ein lýsing av samfelagsligu, búskaparligu og umsitingarligu avleiðingunum. Hetta grundarlag er somuleiðis fortreytin fyri at fáa eitt politisk kjak, bygt á faktiska vitan.*

*Føroya Arbeiðsgevarafelag fer ikki í løtuni at leggja seg fast á, eftir hvørjum leisti hetta tættari samstarvið skal skipast, uttan at eitt neyðugt útgreiningararbeiði verður gjørt sum grundarlag undir eini støðutakan.*

*EFTA-londini hava handilssáttmálar við fleiri ymisk lond, sum eisini eru áhugaverd hjá føroyingum at fáa sáttmálar við. Spurningurin í hesum sambandi er, um Føroyar, um vit gerast limir, fáa atgongd til hesar sáttmálar, tvs um Føroyar av sær sjálvum gerast partur av hesum handilssáttmálum, um EFTA skal taka upp nýggjar samráðingar við øll londini, fyri at Føroyar kunnu gerast partur av hesum, ella um Føroyar skulu samráðast um allar sáttmálarnar av nýggjum?*

*Viðvíkjandi EBS so inniber EBS bæði limaskap í EFTA og samstundis eitt sera tætt tilknýti til ES. Viðvíkjandi EBS er tó greitt, at Føroyar ikki kunnu gerast partur av hesum samstarvi, sum nú er. Neyðugt er at fáa lýst, hvat fyrireikingar-arbeiði skal gerast, um Føroyar skulu kunna gerast partur av EBS, um Føroyar sum land er klárt at seta ES-lóggávu á innara marknaðinum í gildi í Føroyum, umframt hvat EBS-luttøka merkir umsitingarliga fyri Føroyar?*

*Um tað ikki ber til at gerast partur av EBS, hevur tað stóran týdning hjá vinnuni, at Føroyar undir øllum umstøðum gerast partur av teimum fýra frælsunum í ES og EBS-økinum annars. Í tí sambandi eigur at verða útgreinað, hvørt tað ber til hjá Føroyum á annan hátt at fáa avtalu við ES um tey fýra frælsini, og hvat ES í tí førinum hevði kravt afturfyri.*

*Fyri at fáa svara hesum spurningum og øðrum við, mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at ein bólkur verður settur, har umboð fyri tað almenna, vinnuna og serfrøðina annars eru umboðaði. Hesin bólkur skal hava til uppgávu at fáa útgreina nakrar av omanfyrinevndu spurningum og koma við eini ætlan fyri, hvørjir møguleikar eru fyri, at Føroyar kunnu fáa eitt tættari tilknýtið til EFTA ella ES, herundir eisini fíggjarligu avleiðingarnar. Hetta arbeiði kann síðan gerast faktuella grundarlagið undir einum komandi kjaki um evnið."*

## Vinnunám

Vinnunám er skeiðstænasta Vinnuhúsins. Her verður skipað fyri skeiðum og kunningardøgum til limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðs-gevarafeløgum undir hesum.

Upprunaliga endamálið við Vinnunám var at vera við til at økja um fakliga førleikan hjá

fyritøkum - bæði á leiðslustøði, men eisini innan ítøkiligar partar av gerandisdegnum í eini fyritøku.

Tað hevur tó víst seg, at tá skipað verður fyri yvirskipaðum skeiðum, sum ofta takað 2-3 dagar, er undirtøkan ikki stór. Hinvegin er áhugin stórur, tá skipað verður fyri kunningardøgum um meiri ítøkilig mál.

Vinnunám hevur sostatt lagt seg eftir at bjóða limunum skeið og kunningardagar, sum er beinrakin og viðkomandi fyri vinnuna á einum ítøkiligum støði.

Hetta síðsta árið hevur skipað fyri kunningardøgum um útlendingalógina, hvítvaskingarlógina, e-MVG, roknskapar- og partafelagslógina, lærlingaviðurskifti. Eisini hevur verið skipað fyri einum tiltakið um, hvussu fyritøkan kemur styrkt burturúr fíggjarkreppuni.

## Vinnudagurin 2008

Vinnudagurin 2008 varð hildin 26. september í Norðurlandahúsinum. Aftur hesuferð var undirtøkan fyri Vinnudegnum góð, og sum vanligt vóru Ársins Átak og Ársins Virki kosin á degnum. Ársins Átak verður valt fyri at heiðra virki ella persón, sum hevur gjørt serligt átak, ið kann gagna vinnuligum framburði. Átakið hesuferð gjørdist Decision3, sum er farið undir eina granskingarætlan, sum hevði til endamáls at menna eina skipan, sum ger tað møguligt at máta dýpdargangin hjá einum skipi og samstundis máta bylgjurnar rundan um skipið. Harafturat var eisini eitt langtíðarmál at nýta nýggju mátingarnar til orkusparing.

Dómsnevndin segði millum annað, at *”at tað er farið at leka alt meira millum teori og praksis, soleiðis at skilja, at gransking og vinnuligi gerandisdagurin eru farin at nærkast hvør øðrum alt meir og meir.*

*Tað var hesa jaligu gongd í føroyskari vinnulívsmenning, ið dómsnevndin valdi at vísa á í valinum av Ársins Átaki. At hugskot, sprottin úr granskingarumhvørvi, kennast so mikið verd í vinnuligum høpi, at vinnan setir pening í menningina av hugskotinum, einans við teirri trygd, at hon fær sín ágóða, um hug-skotið ber sum ætlað.”*

**Ársins Virki 2009** gjørdist Articon. Í grundgeving síni segði dómsnevndin: *”Tað er hvørki nýtt ella serføroyskt, at vinnur og vinnulív hava góðar og vánaligar tíðir. Eina tíð kann vera úr at gera og nógv at vinna, og bert fá ár seinni er arbeiðsloysi og reyð tøl hjá at kalla øllum fyritøkum í vinnuni. Ofta og títt henda skiftini so óvart og brádliga – helst er tað tann verra vegin – at fleiri fyritøkur hava ilt við at fóta sær.*

*Góður virkisútbúnaður ger ikki munin. Í summum vinnum kann tað vera tilfeingið, ið svíkur, ella náttúran, men vanligast er tað heims búskapurin, og tá sæst tað skjótt í marknaðinum. Er fyritøkan ikki lagað til marknaðin, og hvussu hann háttar sær, fær ósamsvar millum fyritøku og marknað vanlukkuligar avleiðingar fyri fyritøkuna.*

*Vit vita øll, at tað eru starvsfólkini í fyritøkuni, sum standa fyri sambandinum millum fyritøku og marknað. Tað eru tey, sum við sínari vitan og útbúgving, sínum førleikum og vilja at veita marknaðinum tað, hann biður um, skapa ta álit á fyritøkuni, ið ber langt inn í versnandi tíðir. Starvsfólkið kann eisini síggja nýggjar møguleikar, avbjóðingar, hóttanir og ofta koma við nýggjum hugsanum um at tæna marknaðinum betri.*

*Hvør kundi er nýggjur, sjálvt gamal samstarvsfelagi, og hvør uppgáva er nýggj, sjálvt um hon líkist henni, ið varð greidd í gjár. Fleiri fyritøkur viðurkenna og virða avbjóðingina, ið liggur í hesum veruleika, og hvør kundauppgáva verður tí skipað sum verkætlan við arbeiðsbólki samansettum út frá teimum krøvum, ið dygdar-góð loysn setir. Vani bítur best, men dagurin í dag krevur nýggjar og rætt tillagaðar loysnir, ikki gamalt bit. Fólk duga sjálvi at taka røttu avgerðirnar, kennast tey við málini, og best duga tey í eggjandi samstarvi.*

*Nevndin fegnast um, at alt fleiri fyritøkur í Føroyum ganga hesa leið í skipan av virki og uppgávum, við denti á fjøltáttaða útbúgving og endurútbúgving av starvsfólki, ið loysir uppgávurnar í toymum, har dygd, trygd og trivnaður verður sett í hásæti. Tær viðurkenna, at hetta eru fyritreytir fyri góðum kappingarføri*

*og vøkstri og fyri vaksandi svørtum tølum á botnlinjuni.*

*Nevndin er samd um at velja eitt av hesum virkjum, ið eftir fáum árum við denti á dygd, trygd, trivnað og starvsfólkamenning hevur megnað at vaksið seg til at verða millum tey størstu í sínari vinnu í Føroyum, og sum hevur staðið seg væl í kapping og samstarvi við stóru útlendsku kappingarneytarnar.*

*Tíðirnar hava ikki verið ímóti í hesari vinnu seinnu árini, men at vaksa frá byrjan í 2001 til í dag at vera ein av størstu fyritøkunum gerst ikki bara við hepni. Kappingarneytarnir eru sterkir og gamlir í garði. Men orðhaldni, framúr fyrireiking í toymisvirki og ágrýtnið hjá hesum toymum at loysa uppgávurnar væl innan avtalaða tíð og við tí góðsku, sum er avtalað, hevur givið úrslit.*

*Articon er byggifyritøka, sett á stovn í 2001 við partapeningi upp á 1,6 mió. kr. og við eginpeningi ultimo 2007 upp á 33,1 mió. kr. Eginpeningsavkastið áðrenn skatt varð í 2007 50%, og avlopið eftir skatt varð 9,8 mio. kr. Starvsfólkatalið hevur verið støðugt vaksandi og í dag starvast 115 fólk í fyritøkuni. Dómsnevndin er tí samd um, at velja P/F ARTICON til Ársins Virki 2008.”*

# Gongdin innan ymisku vinnugreinarnar

## *Fiski- og flakavinnan*

### Gongdin í fiski/flakavinnuni

**Útflutningurin**

Samlaða útflutningsnøgdin av fiskavørum minkaði lutfalsliga nógv í 2008, men var tó framvegis størri enn í 2006. Sambært hagtølunum stavar lækkingin serliga frá útflutningi av fiskamjøli, makreli, lodnu, svartkjafti og hýsu. Men hinvegin telur, at nøgdin av laksi og sild øktist lutfalsliga nógv í 2008. Stóra lækkingin í útflutningsnøgdini sást eisini aftur í útflutningsvirðinum, ið minkaði við umleið 7% í 2008. Samlaða útflutningsvirðið av fiskavørum í 2008 var umleið 3,5 mia.kr.

Samlaða útflutningsnøgdin av flaki – frystum og køldum – úr toski, hýsu og upsa, øktist nakað í 2008, men kortini minkaði útflutningsvirðið. Serliga tvær orsøkir eru til lækkaða virðið. Onnur er, at prísurin á toskafløkum minkaði lutfalsliga nógv, og hin er, at nøgdarsamansetingin av fløkum úr hýsu og upsa broyttist soleiðis, at nøgdin av hýsufløkum minkaði, meðan nøgdin av upsafløkum øktist. Orsøkin til, at hetta ávirkaði virðið, er, at miðalprísurin á upsafløkum var umleið 10 kr/kg lægri enn á hýsufløkunum.

Nøgdirnar av útfluttum saltfiski minkaðu við umleið 1.400 tonsum í 2008 og stavaði hetta serliga frá minni nøgdum av saltaðum upsa. Hinvegin var miðalprísurin á saltaðum toski nakað hægri í 2008 enn í 2007, og tí var afturgongdin í útflutningsvirðinum á saltfiski avmarkað til umleið 7 mió.kr. Í 2008 var útflutningsvirðið á saltfiski góðar 330 mió.kr.

Útfluttu nøgdirnar av frystum og feskum óvirkaðum fiski minkaðu nógv í 2008, bæði í nøgd og virði. Samanlagt eru nøgdirnar av toski, hýsu og upsa minkaðar við 5.500 tonsum, ið svarar til eina afturgongd á umleið 42%. Minkingin í útflutningsvirðinum var góðar 90 mió.kr.

**Rávørutilgongdin**

Um hugt verður eftir fiskiskapinum seinastu tvey árini, kann staðfestast, at feskfiskaveiðan í 2008 var 8% lægri enn í 2007. Verður roknað í mun til 2006, er minkingin seinastu tvey árini tilsamans er 17%.

Avreiðingarvirðið í 2008 var slakar 900 mió.kr., samanborið við 1,16 mia.kr. í 2007 og 1,25 mia.kr. í 2006. Lutfalsliga svarar hetta til eina minking í 2008 uppá 23%, í mun til 2007, og umleið 29% í mun til 2006.

Talvan í mynd 4 vísir, at minni er avreitt av flestu fiskasløgum í 2008 enn í 2007. Í tonsum er tað serliga lækkingarnar á hýsu og upsa, við ávikavist 5.400 og 4.400 tonsum, ið skilja seg burturúr, men við heili 42 prosentum eru tað tó nøgdirnar av hýsu, ið lutfalsliga minka nógv mest.

| | **Nøgd í tonsum** | | **Virði í 1.000 kr.** | | **Miðalprísur pr. kg** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2007** | **2008** | **2007** | **2008** | **2007** | **2008** |
| **Toskur** | 12.829 | 11.734 | 291.387 | 237.948 | 22,71 | 20,28 |
| **Hýsa** | 12.870 | 7.453 | 178.353 | 84.154 | 13,86 | 11,29 |
| **Upsi** | 55.326 | 50.872 | 289.891 | 258.653 | 5,24 | 5,08 |
| **Annar botnfiskur** | 12.668 | 11.853 | 132.680 | 109.605 | 10,47 | 9,25 |
| **Flatfiskur tils.** | 6.118 | 5.379 | 176.470 | 112.867 | 28,84 | 20,98 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 21.235 | 24.293 | 95.375 | 94.322 | 4,49 | 3,88 |
| **Veiðan tilsamans** | **121.045** | **111.585** | **1.164.155** | **897.549** | | |

*Mynd 4. Feskfiskaveiða: Nøgd, virði og miðalprísur í 2007 og 2008 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Talvan í mynd 4 vísir eisini, at avreiðingarprísurin pr. kg. á so at siga øllum fiskasløgunum er munandi lækkaður frá 2007 til 2008. Einasti miðalprísur, ið heldur sær nøkulunda, er upsaprísurin.

**Flakavinnan**

Ikki allir almennu roknskapirnir fyri 2008 eru tøkir enn, men tað ljóðar frá virkjunum, at úrslitini í 2008 líkjast teimum frá 2007. Nøkur virkir kláraðu seg ikki væl í 2008, og okkurt teirra er fyribils latið aftur. Aftur onnur hava gjørt nýggjar avtalur við fíggingarstovnar og kunnu tí halda fram.

Um hugt verður eftir almennu roknskapartølunum fyri 2007, sæst at samlaða úrslitið hjá virkjunum var vánaligt. Skulu vit lýsa gongdina hjá virkjunum og korrigera fyri óvanligum niðurskrivingum og úrsliti frá døttur- og assosieraðum feløgum, ið ikki fáast við fiskaframleiðslu, fæst eitt samlað úrslit, áðrenn skatt og óvanligar postar, sum gevur eitt hall á umleið 5 mió.kr.

Hóast samlaða myndin ikki var so jalig, var tó ójavnt, hvussu 2007 royndist hjá ymisku feløgunum. Á mynd 5 sæst, at 9 feløg høvdu avlop áðrenn skatt, meðan 9 feløg høvdu hall. Feløgini við positivum úrsliti høvdu tilsamans umleið 12 mió.kr. í avlopi, meðan feløgini við negativum úrsliti høvdu tilsamans umleið 17 mió.kr. í halli.




*Mynd 5. Korrigerað úrslit, áðrenn skatt og óvanligar postar, hjá 18 feløgum. (Vinnuvitan.biz og egnar tillagingar)*

## Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu

**Fiskiskapurin**

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2008/2009, sigur Havstovan, at stovnarnir av toski á Føroya Banka og á landgrunninum eru søguliga illa fyri, at hýsustovnurin er í skjótari minking, meðan upsastovnurin hinvegin er hampuliga væl fyri. ICES mælti til onga veiðu eftir toski og hýsu í 2009, og at veiða eftir upsa varð skerd við 20%. Í sínum grundgevingunum sigur Havstovan eisini, at best hevði verið at banna allari veiðu eftir toski og hýsu, men at tað vildi elvt til, at næstan allur flotin varð lagdur. Havstovan mælti tí í staðin til, at fiskidagatalið hjá línuskipunum og øðrum skipabólkum, ið serliga veiða tosk og hýsu, varð minkað við 50%, meðan fiskidagatalið hjá partrolarunum varð minkað við 20%. Sambært Havstovuni vísa framskrivingar, at hesir niðurskurðir, saman við øðrum reguleringum, vildu fingið toskastovnin at vaksa spakuliga aftur. Politisk semja fekst tó ikki um tilmæltu niðurskurðirnar, og lóggivið varð at enda um ein niðurskurð í fiskidaga-talinum uppá 10% hjá øllum skipabólkum.

Samanumtikið mugu vit helst ásanna, at útlitini fyri fiskiskapin eftir toski og hýsu ikki eru nakað serlig, og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðunøgdin av toski og hýsu eisini fer at minka í 2009.

Upsafiskiskapurin tykist at hava rímulig útlit, og tað er okkurt, ið kundi týtt uppá, at nøgdirnar av upsa gerast størri í 2009 enn í 2008. Onnur fiskasløg, sum t.d. brosma og longa, tykjast at vera rættuliga støðug, og helst verður veiðan í 2009 á leið tann sama ella størri enn í 2008. Veiðan av gullaksi er økt nógv seinnu árini og kom í 2008 upp móti tí, ið Havstovan metir vera markið fyri burðardyggari veiðu. Hugsast kann tí, at henda nøgd ikki fer at økjast í 2009.

**Marknaðirnir**

Eisini hjá teimum, ið starvast í fiskivinnuni, var 2008 í nógvar mátar eitt baldrut ár. Fíggjarkreppa og búskaparkreppa, ið á ymiskan hátt høvdu ávirkan á arbeiðsumstøðurnar í 2008, eru eisini við til at mynda útlitini framyvir. Nevnast kann í hesum sambandi, at búskaparliga skrallið í Íslandi og tann nógv viknaða íslendska krónan hava givið okkara íslendsku kappingarneytum ein stóran fyrimun. At norska krónan og bretska pundið eru nógv viknað í mun til evruna og donsku krónuna, hevur eisini neiliga ávirkan á kappingarførið hjá føroyskum virkjum. Samstundis mugu vit ásanna, at keypiorkan hjá kundunum er hart rakt av gjaldføriskreppuni, ið hevur rakt allan heimin.

Samanumtikið má tí sigast, at 2009 sær út til at gerast enn eitt avbjóðandi ár fyri føroysku fiskivinnuna. Higartil eru flestu prísir á okkara vørum, undantikið laksi, falnir, og tað hevur sum heild gingið óvanliga illa at sleppa av við framleiðsluna. Vónir eru tó um, at støðan á heimsmarknaðinum skjótt fer at gerast betri, og at tað tá kemur glið á aftur søluna, og at prísirnir samstundis fara at kvinka upp eftir.

## *Alivinna*

Alivinnan er væl fyri og úrslitini seinastu árini hava verið góð. Seinastu árini hava verið seks feløg, sum standa fyri alivirkseminum í Før-oyum. Harafturat eru tvey smærri feløg, sum einans framleiða sílayngul, og Fiskaaling, sum rekur royndarvirksemi innan aling. Karmarnir um alivinnuna er góðir, og hevur alivinnan ein skynsaman rakstur, har neyv framleiðslustýring er.

Bygt á góðar karmar og nærlagni, er alivinnan í dag burðardygg. Hetta sæst aftur, tí fiskurin veksur væl og hevur sera lágt fellið, saman-borið við størstu kappingarneytarnar í Noregi og Kili. Saman við hampiliga góðum mark-naðarprísum hevur hetta gjørt, at alivinnan hevur nøktandi avkast í 2008.

Meðan framleiðslan í 2006 og 2007 varð eyð-kend fyri, at sera lítið var av fiski, var fram-leidda nøgdin av laksi og sílum í 2008 umleið 47.000 tons í rundari vekt. Tann avbera góði marknaðarprísurin, sum var í 2006, helt sær tó ikki í 2007, men tó hevur prísurin í 2008 verið hampiligur. Samlaða útflutningsvirðið frá alivinnuni í 2008 var góðar 900 mió. kr.




*Mynd 6. Útflutningur av alifiski í virði frá 1997 til 2008 (1000 kr). www hagstova.fo*

Samanumtikið hevur 2008 verið eitt gott ár og sigast kann, at alivinnan hevur er komin uppaftur á eina burðardygga og stabila framleiðslu-nøgd. Í ár verður mett, at tøkan verður á leið tann sama sum í 2008.

Í 2007 øktist útboðið av laksi á evropeiska marknaðinum og var eitt trýst á laksaprísinum. Í 2008 hevur gongdin verið á leið tann sama. Lági kursurin á norski krónuni gjørdi, at laksaprísurin til føroyska alaran eitt tíðarskeið seint í 2008 var ájavnur við framleiðsluprísin. Marknaðarprís-urin er síðani hækkaður aftur samstundis sum kursurin á norsku krónuni eisini er hækkaður nakað aftur. Hvørji útlitini eru, er torført at meta um, men tað vísir seg, at laksaprísurin heldur sær betri enn prísurin á øðrum fiskasløgum á evropiska marknaðinum. Alisøgan sigur frá, at prísurin kann sveiggja sera nógv, men roknað verður við, at um alarar hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan megna at liva við teimum príssveiggjum, sum fara at koma.

At føroyska alivinnan var stong úti av russiska marknaðinum 1. sept. 2008 var ein stórur smeitur fyri alivinnuna. Alivinnan hevur seinnu árini bygt upp ein marknað í Russlandi, sum var áhugaverdur serliga fyri stóran laks, sum ikki gevur givið so góðan prís á ES marknaðinum. Stórt arbeiðið var lagt í at fáa opnað russiska marknaðin aftur, og nú eru útlit fyri, at útflytast kann til Russlands aftur í næstum.

Við ásetingum um árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburði verður mett, at alivinnan er áleiðis til at hava góðar karmar fyri burðardyggum rakstri. Tað eru hend stór framstig á hesum økinum, og tað er sera týdningarmikið, at vinnan og myndugleikarnir alsamt arbeiða við at gera hesar karmar enn betri.

Sum víst var á seinasta ár, so eru onkur vandamál við verandi støðu. Alivinnan metir, at eitt veikt lið fyri vinnuna er innflutningurin av rognum. Tí tók vinnan felags avgerð um, umfamt at brúka føroysk rogn, bert innflyta rogn úr Íslandi í 2008. Hetta var gjørt fyri at vera fyrivarin fyri sjúku.

Seinastu árini eru royndir gjørdar við at ala tosk. Fiskaaling framleiddi toskayngul og tvær alifyritøkur settu tosk út til framleiðslu. Meginparturin av fiskinum er nú tikin og samanumtikið kann sigast, at framleiðslan gekk væl. Fiskurin vaks serstakliga gott og munandi betri enn toskur hjá okkara kappingarneytum. Lønsemi í framleiðsluni hevur tó ikki verið nøktandi, og fallandi marknaðarprísir hava gjørt sítt til, at henda aling ikki er lønsom.

Sum heild kann sigast, at útlitini fyri alivinnuna eru góð, og roknað verður við, at framleiðslan í 2009 verður á sama støði sum 2008.

# *Handverksvinnan*

## Gongdin í handverksvinnuni

Til tess at lýsa gongdina í handverksvinnuni verður fyrst hugt eftir lønargjaldingum í ymiskum handverksvinnum.

Mynd 7 vísir gongdina í lønargjaldingum frá 2002 til 2008. Hesar eru tilsamans hækkaðar úr 905 mió.kr. í 2007 til 936 mió.kr. í 2008. Tað er tó bert innan byggivirksemi, at hækkingarnar eru at síggja, tí bæði skipasmiður, aðrar smiðjur og ídnaðarvirksemi annars hava lægri lønargjaldingar í 2008 enn í 2007.

Vøksturin í samlaðum lønargjaldingum fyri hesar vinnur svarar í 2008 til 3,4%, ið er munandi minni enn í 2007 og 2006, men tó hægri enn miðal hækkingin í tíðarskeiðnum 2003-2005.

Samanborið við lutfalsliga vøksturin í samlaðum lønargjaldingum, var vøksturin í byggivinnuni aftur í 2008 eini 3 prosentstig hægri enn miðal lønarvøksturin. Úrslitið av hesum er, at handverksparturin av samlaðu lønargjaldingunum framvegis er spakuliga vaksandi, og var í 2008 komin uppá 13,3%. Fyri at lýsa gongdina innan ymiskar partar av byggivinnuni og um landi seinastu árini, hava vit hugt at nøkrum hagtølum.

| **Vinnugrein** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skipasmiðjur, smiðjur | 130,1 | 130,9 | 124,7 | 130,6 | 144,6 | 162,3 | 162,0 |
| Ídnaður annars | 219,0 | 223,9 | 218,6 | 223,4 | 230,8 | 247,9 | 242,9 |
| Bygging | 342,0 | 344,3 | 380,6 | 377,3 | 437,8 | 495,0 | 531,1 |
| *Tilsamans* | **691,2** | **699,1** | **723,9** | **731,4** | **813,1** | **905,2** | **935,9** |
| | | | | | | | |
| **% av samlaðum lønargjaldingum** | 12,0% | 12,1% | 12,4% | 12,2% | 12,6% | 13,0% | 13,3% |
| % vøkstur í lønargj, handverksvinnan | 10,8% | 1,2% | 3,5% | 1,0% | 11,2% | 11,3% | 3,4% |

*Mynd 7. Lønarútgjaldingar í handverskvinnuni 2002-2008 (www.hagstova.fo)*

Mynd 8 vísir innflutningin av tilfari og lutum til byggivinnuna frá 2000 til 2008. Tey fyrstu árini var innflutningurin rættuliga støðugur og lá millum 300 og 400 mió. Í 2006 hækkaði innflutningurin tó við 20%, og í 2007 hækkaði hann við heili 34%, soleiðis at innflutningurin til byggivinnuna í 2007 var góðar 600 mió.

At ein partur av hesum vøkstri óivað stavaði frá øktum byggivirksemi, kundu vit grundað á vøksturin í lønargjaldingum, sum henda vinna hevði í sama tíðarskeiði. Hinvegin er einki at ivast í, at stóri vøksturin eisini var grundaður á eina príshækking á teimum vørum, ið vórðu innfluttar til nýtslu í byggivinnuni.

Tað sæst tó, at tindurin varð rokkin í 2007, og at virðið á innflutninginum lækkaði við góðum 11% í 2008, tá innflutningsvirðið var 540 mió.kr.




*Mynd 8: Innflutningur til byggivinnu í tkr.* www.hagstova.fo

Tað finst eingin fullfíggjað sethúsa- ella bygningsskráseting, og besta ábendingin um, hvussu nógv sethús eru bygd í einum ávísum ári, fæst tí við at hyggja eftir skrásetingum hjá SEV viðvíkjandi gjøldum fyri (ný)íbindingar í elkervið. Henda skráseting er bólkað í sethús og "annað", sum fevnir um vinnu- og almennar bygningar, íbúðir, neyst, úthús o.a., umframt víðkanir viðvíkjandi verandi innleggingum.

Mynd 9 vísir, at frá 2001 til 2006 lá talið av nýbygdum sethúsum rættuliga støðugt á 160-170 eindum. 2007 sær tó út til at hava verið eitt heilt serligt ár, hvat nýbygdum sethúsum viðvíkur, tí talið hetta árið er meira enn tvífalt so stórt sum árini frammanundan. Hetta árið vóru fleiri sethús bygd kring alt landið, men stóri munurin sást serliga aftur í Streymoynni, og man stóra útstykkingin í Hoyvíkshaganum helst vera frágreiðing til stóran part av hesari øking.




*Mynd 9: Nýbygging skift á sethús og annað* www.hagstova.fo

Í 2008 kom talið av nýbygdum sethúsum niður aftur á 225, sum er ein munandi afturgongd í mun til tey 357 húsini, ið vórðu bygd í 2007. Hetta eru tó framvegis væl fleiri enn tey gott hálvtannaðhundrað sethúsini, ið árliga vóru bygd í tíðarskeiðnum 2001 til 2006. Í so máta var støðið í 2008 tí framvegis høgt, men áhugavert verður at síggja, á hvørjum støði byggingin verður í 2009.

Tølini fyri aðra nýbygging sveiggja vanliga meira enn fyri sethúsini, men av tí at bólkingin í "annað" er so illa sundurgreinað, ber tíverri ikki til at siga, um henda hækking stavar frá íbúðum, neystum, úthúsum ella onkrum øðrum. Ynskiligt er tí, at bólkingin í "annað" varð betri útgreinað.

Mynd 9 niðanfyri vísir tó, at onnur bygging enn sethús hevur verið hægri í 2008 enn í nøkrum av hinum árunum.

## Útlit fyri handverksvinnuna

Bæði landsstýrið og kommunurnar hava seinnu árini hildið ein lutfalsliga javnan íløgukarm. Hesa gondina hevur Føroya Handverksmeistara-felag verið fegið um, tí at tað at bygging og viðlíkahaldsarbeiði hjá tí almenna verður hildið á einum jøvnum støði, er av stórum týdningi fyri handverksvinnuna. Samstundis er hetta ein trygging móti alt ov stórum sveiggjum í samfelagnum, og ger tí búskapargongdina tryggari. Tá privata virksemið so eisini tók dik á seg, máttu vit tó ásanna, at samlaða virksemið í landinum at enda hevði hug at gerast í meira lagi í mun til ta arbeiðsstyrki, sum handverks-vinnan hevði møguleika at fáa hendur á. Úrslitið varð, sum tað eisini er víst á aðrastaðni, fløskuhálsar og lønarglíðing. Hetta gagnaði hvørki handverksvinnuni ella samfelagnum annars, og tí var ynskiligt við størri javnvág í samlaða virkseminum hjá tí almenna og tí privata.

Umstøðurnar broyttust tó skjótt, tá heimsumfatandi fíggjar- og búskaparkreppan eisini kom á vitjan hjá okkum. Seinastu tíðina er privata byggingin nógv minkað, og í dag eru fløskuhálsar og lønarglíðing ikki tað, ið liggur einum fremst í huga. Tí er tað nú aftur av størsta týdningi, at bygging og viðlíkahalds-arbeiði hjá landi og kommunum er við til at halda virkseminum á einum rímuligum støði.

## *KT-vinnan*

Í KT-vinnuni eru bygnaðarligar broytingar farnar fram seinastu árini. Fleiri fyritøkur hava lagt saman við tí úrsliti, at fleiri størri og sterkari fyritøkur eru á marknaðinum. Hetta er ein jalig gongd fyri vinnugreinina, tí stórar fyritøkur megna meira og hava lættari at tekkast røttu arbeiðsmegini. Somuleiðis kunnu stórar fyritøkur átaka sær størri uppgávur, tí førleikin gerst betri. Henda tilgong fer vónandi at skunda undir, at KT-vinnan fer at bjóða seg enn meira fram bæði í Føroyum, men eisini á útlendskum marknaðum.

Fíggjarkreppu og hall á fíggjarlógini hava merkt KT vinnuna nakað, men ikki í líka stóran mun, sum roknast kundi við. Í stuttum kann sigast, at talið av veitarum er minkað nakað, og tað merkist í vinnugreinini, at tað almenna og vinnan ikki eftirspyrja í sama mun. Teir stóru kundarnir gera ikki stórar KT íløgur í løtuni, og KT vinnan ávirkast av hesum. Mett verður, at útflutningurin av KT-tænastum er vaksin nakað seinnu árini.

Tað er torført at meta um útlitini fyri KT-vinnuna, tí tað er torført at spáa um, nær

heims-búskapurin fer at venda. Bæði vinnan og tað almenna hava tørv á effektivisera, og KT kann verða við til at skapa effektiviseringar. Føroyska KT-vinnan hevur ta áskoðan, at júst í eini kreppu er tørvur á KT til tess at fremja nýskapan og at effektivisera bæði í privata og almenna geiranum.

KT-felagið gjørdi í 2006 eina ætlan fyri føroyska KT-vinnu. KT-felagið mælti til, at útbúgving var sett á stovn á Fróðskapar-setrinum innan KST. Harafturat at umhugsað varð at seta serfrøðingaskipanina í gildi í Føroyum soleiðis, at føroyskar fyritøkur kunnu gerast áhugaverdar hjá vælútbúgnum KT-frøðingum. Somuleiðis mælti felagið til, at tað almenna skipar sín innkeypspoilitikk soleiðis, at til ber hjá føroyskum fyritøkum at bjóða uppá uppgávurnar.

Á fíggjarlógini í 2009 er ikki tann neyðugi peningurin settur av til KST-útbúgving á Fróðskaparsetrinum, og harvið er arbeiðið hjá Fróðskaparsetrinum við at seta granskarar í starv ávirka neiligt. Hetta harmast KT-vinnan um.

## Reklamuvinnan

Fíggjarkreppan hevur eisini merkt reklamu-vinnuna. Í stuttum kann sigast at, talið av veitarum er minkað. Tað eru nú tveir stórir veitarar á marknaðinum saman við nøkrum minni veitarum. Við ársendað 2008 fall virksemið í vinnugreinini nakað, og hevur hetta ført við sær, at nakrar uppsøgnir hava verið í vinnugreinini. Annars kann sigast, at eftirspurningurin eftir tænastum frá hesi vinnugrein hevur flutt seg frá vanligum lýsing-um til meira ráðgeving.

Hóast omanfyri standandi, hevur reklamu-vinnan sum heild havt nøktandi virksemi vegna tillagingar, og mett verður, at 2009 fer at gerast eitt rímuligt ár.

## Ferðavinna

Ferðavinnan hevur leingi verið eitt boð uppá eitt av teimum “nýggju beinunum”, sum skal bera føroyska búskapin. Hóast ferðavinnan í Føroyum helst er økt nakað hesi seinnu árini, er kortini ringt at gera hetta upp ella ávísa hesum ítøkiliga. Ymiskar orsøkir eru til hetta, men tær flestu kunnu kortini bólkast undir eitt felags-heiti, ið er manglandi hagtøl.

Ofta er torført at skilja í millum, hvat hoyrir undir ferðavinnu og hvat hoyrir undir aðrar vinnur. Hagtøl verða t.d. skrásett fyri millumlanda flutning av ferðafólki loft- og sjóvegis, men eingin skilnaður er t.d. ímillum, hvussu nógv av hesum er ferðavinna, og hvussu nógv er arbeiðsørindi. Skilt verður heldur ikki í millum, hvussu stórur partur eru útlendsk ferðafólk, ið koma til Føroyar, og hvussu stórur partur eru føroysk ferðandi, ið fara uttanlands. Hagtølini yvir ferðandi vísa annars, at loftvegis komu gott 111.000 ferðandi til landið í 2008, meðan gott 32.000 komu sjóvegis. Í báðum førum er talan um áleið eina tvífalding yvir 10 ár. Meðan talið loftvegis bara er økt seinastu 10 árini, so er talið sjóvegis minkað við umleið 4.000 ferðandi, síðani tað í 2006 var hægst við yvir 36.000 fólkum.

Eingi almenn hagtøl finnast heldur fyri gistingar, men gistingarhúsini fylgja, hvør í sínum lagi, við hesari gongdini. Út frá hesum vita vit, at talið av gistingum er líðandi minkað hesi seinnu árini; eisini áðrenn vit fingu eina alheims fíggjar- og búskaparkreppu.

Orsakað av manglandi hagtølunum, ber samanumtikið illa til at siga nakað ítøkiligt um samlaðu gongdina í føroyskari ferðavinnu. Vit kunnu tó fegnast um, at tað alla tíðina eru spírar at hóma í ferðavinnuni, og at tað nærum á hvørjum ári verða ment ymisk nýggj tilboð til ferðandi í Føroyum. Hinvegin kann spurnartekin setast við, hvussu leingi hesi

tilboð eru á marknaðinum, um tað ikki eydnast at fáa talið av ferðafólki at vaksa.

Í fjør tóku fleiri feløg, sum burturav ella partvís arbeiða við ferðavinnu, stig til at stovna Ferðavinnufelagið (FVF), ið ætlandi skal fáa ein savnandi leiklut fyri tey, ið eru vinnuliga virkin í ferðavinnuni. Hugsanin er, at hetta felag skal hava orku til at hava fólk í starvi til at taka sær av uppgávum fyri ferðavinnuna, men enn eru fíggjarligu karmarnir ikki skaptir fyri hesum. Felagið ætlaði at fáa hesi viðurskifti avgreidd í vár, men av ymiskum orsøkum hevur hetta drigið út. Miðað verður nú í staðin eftir at fáa hetta avgreitt í heyst.

Í løtuni eru útlitini ikki tey bestu fyri fíggjarligari framgongd í ferðavinnuni. Henda meting byggir serliga á truplu tíðirnar, ið flestu lond á okkara leiðum merkja sviðan av í dag. Í løtuni er trupult at fáa útlendsk ferðafólk at keypa ferðaseðil til Føroya, og hetta merkist sjálvandi aftur í øðrum pørtum av ferðavinnuni. Vit plaga tó at siga, at tá búskaparútlitini ikki eru so góð, ferðast fólk vanliga meir í egnum landi. Tí er væntandi, at tann parturin av ferðavinnuni, ið megnar at selja síni tilboð til føroyingar, hevur møguleika at klára seg væl í hesum tíðum.

Hóast tað higartil í ár hevur verið sagt frá minkandi tali av ferðafólki um flogvøllin og munandi færri gistingum, eru tó eisini aðrir glottar at hóma, tí líkt er ikki til, at talið av útlendskum ferðamannaskipum verður minni í 2009 enn í 2008. Tvørturímóti er sagt frá, at hesi vera størri og nakað fleiri í tali í ár.

Tosað vit um útlit longur frammi í tíðini, er vert at nevna, at tað í løtuni fer ein tvørgangandi verkætlan fram, hvørs endamál er at finna fram til kappingarsamleika Føroya. Arbeiðsgongdin í hesari verkætlan er drúgv, men málið er at finna fram til eina sanna ímynd av Føroyum, sum føroyska samfelagið kann taka undir við, og sum kann brúkast í marknaðarføringini av Føroyum sum ferðamannaland, sum útflutningstjóð og mangt annað. Ætlanin er, at hetta skal geva Føroyum eina greiðari vangamynd uttanlands, og vónandi verður eitt av úrslitunum, at lættari verður at fáa ferðafólk henda vegin.

Ferðavinnan er framvegis ein lutfallsliga nýggj vinna í Føroyum og avmarkað er, hvussu væl hon megnar at gera vart við seg sjálva, bæði heima og uttanlands. Einstøku fyritøkurnar hava sjálvdan fíggjarliga megi til munadygga marknaðarføring, og tí er ringt at fáa eyga á nakra veruliga “branding” av føroysku ferðavinnuni. Nakrar royndir eru gjørdar at samstarva um marknaðarføring, men framvegis munar hetta ov lítið í tí stóra høpinum. Nakað verður eisini gjørt frá almennari síðu, men eisini hetta tykist at gera ov lítlan mun. Ásannast má, at fíggjarliga orkan hjá landi og fyritøkum ikki er stór, og tí er neyðugt, at marknaðarføringin av Føroyum sum ferðamannaland verður meira miðvís enn higartil. Í hesum sambandi er verkætlanin við at finna fram til kappingar-samleika Føroya sera viðkomandi og spennandi. Tá funnið er fram til kappingarsamleikan er tó eisini alneyðugt, at avvarandi myndugleikar eru til reiðar at brúka neyðuga peningin til at marknaðarføra henda samleika á ein slíkan hátt, at tað munar.

Ein treyt fyri at kunna arbeiða meira miðvíst er eisini, at tað finst haldgott hagtalsgrundarlag til at byggja avgerðir á. Nakað av peningi er játtaður og nakað av arbeiði er eisini gjørt á hesum øki, men enn mangla vit at síggja endaligu úrslitini av hesum. Mælt verður tí til, at endin ikki verður sleptur á hesum arbeiði, men at tað verður gjørt liðugt, sett í verk og leypandi ment og hildið við líka.

## *Handilsvinna*

Handilsvinnan merkir beinavegin tá búskapurin vendir. 2008 var sum heild eitt gott ár hjá føroysku handilsvinnuni, men higartil í 2009 merkir handilsvinnan generelt eitt fall í eftirspurninginum. Handilsvinnan er ein samansett vinna og tað er ikki rætt at gera felags niðurstøðu fyri alla handilsvinnuna sum heild. Um vit útgreina handilsvinnuna sæst, at bilasølurnar merkja væl, at eftirspurningurin er fallin sum ein beinleiðis avleiðing av

fíggjarkreppuni. Sølan av nýggjum bilum fall munandi og steðgaði nærum upp. Sølan av brúktum bilum er eisini fallin nakað, men ikki í sama mun. Atgongd til fígging hevur í seinnu helvt av 2008 víst seg at vera ein trupuleiki, men tað vísir seg at vera heldur lættari nú 2009 er nærum hálvrunnið.

Tann parturin av handilsvinnuni, sum fæst við kolonialvørur, hevur havt eina minni afturgongd, og keypsmynstrið hevur broytt seg nakað. Kundarnir ansað betur eftir, hvat og hvussu nógv verður keypt, og keyptar verða yvirhøvur bíligari vørur.

Verður hugt eftir sølu av hvítvørum og køkum sæst, at hendan er nær tengd at gongdini í sethúsa- og íbúðarbyggingini. 2008 var eitt rímuliga gott ár, men í 2009 merktist ein greið afturgongd í eftirspurninginum. Nakað tað sama ger seg galdandi fyri møblar og annað innbúgv.

Tað er ójavnt, hvat er at frætta viðvíkjandi sølu av klæðum og líknandi. Summar fyritøkur selja á leið tað sama higartil í 2009 sum undanfarin ár, meðan onnur hava havt afturgongd. Fyri vinnuna sum heild eru fleiri fyritøkur steðgaðar, og mett verður, at samlaða sølan er minkað.

Sølan av byggitilfari er minkað. Her verður serliga hugsað um tann partin, sum hevur samband við størri verkætlanir og nýbygging. Hetta er meira útgreinað í serstakari viðgerð av handverksvinnuna omanfyri.

Samanumtikið var 2008 eitt gott ár hjá handilsvinnuni, meðan 2009 hevur verið merkt av óvissu, og hevur tað ávirkað nýtsluna. Útlitini hanga neyvt saman við gongdini í búskapinum annars. Um búskarstøðan ikki versnar ella vendir, eru útlitini fyri restina av 2009 hampulig, men um búskapargongdin ikki vendir, kann væntast ein munandi afturgongd í vinnugeinini.

## *Oljuvinnan*

Oljuvinnan hevur síðani í heyst verið merkt av fallandi oljuprísum. Hetta hevur ávirkað virksemið í vinnugreinini, og serliga leitivirksemið hevur verið merkt av hesum. Føroyskar fyritøkur eru mest virknar í samband við oljuleiting, og gongdin hevur tí ávirka føroyskar fyritøkur skeiva vegin.

Eftir ætlan skuldi ENI byrja eina oljuboring í føroyskum øki á sumri í ár. Nú eru tó tað hent, at boripallurin, sum nýtast skal, verður ikki tøkur fyrr enn seinni í heyst. Hetta merkir, at boringin verður fyribils útsett til februar/mars 2010 fyri at sleppa undan eini vetrarboring.

Hetta er sjálvsagt óheppið fyri føroysku veitararnar, serliga teir, sum hava avsett orku til at virka fyri ENI. Hóast hetta, sigur Jarðfeingi seg hava góðtikið seinkingina út frá eini staðfesting av, at royndirnar við vetrarboringum ikki hava verið so góðar.

Tað hevur viðhvørt verið trupult hjá føroyskum fyritøkum at koma framat sum veitari til boringar í føroysum øki. Hinvegin hevur tað eisini, serliga í tíðum við stórum virksemi annars, víst seg at verið trupult hjá føroyskum fyritøkum at rúma eykað virksemi í nakrar fáar mánaðir. At føroyskar fyritøkur eru komnar uppí leitivirksemið í føroyskum øki, hevur ment føroyskar fyritøkur, og hevur givið fleiri av teimum møguleikar í altjóða oljuvinnuni. Tað er tí av alstórum týdningi, at føroysk umsiting framhaldandi virkar fyri at veita føroyskum fyritøkum møguleika at menna sín leiklut í oljuvirksemi undir Føroyum ella uttanfyri Føroyar.

Nú oljuleiting er farin fram í Føroyum í út við 8 ár, hevur verið tosað um at gera eina eftirmeting av lóggávuverkinum og praksis rundanum oljuleiting og oljuvirksemi í Føroyum. Vinnan metir hetta skilagott og mælir til, at eitt framhald av arbeiðinum hjá Oljuráðleggingar-nevndini verður skipað, har eisini vinnan verður tikin við uppá ráð.

## *Fíggjarvinna*

Eftir mong ár við góðum vøkstri, fall vøksturin í fíggjarvinnuni í 2008.

| | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|
| **Starvsfólkaútreiðslur** | 198.287 | 238.001 | 255.357 |
| **Ársverk** | 495 | 530 | 501 |

*Mynd 10 Ársverk í fíggjarvinnuni 2006 til 2008. Kelda: Ársfrásøgnir*

Búskapurin í Føroyum hevur staðið seg væl tey seinastu árini og arbeiðsloysið hevur verið metlágt í 2008 (1,3%.) Hetta hevur fíggjarvinnan nýtt gott av, og hevur vinnan ment seg nógv seinnu árini. Frá 2006 til 2008 vaks starvsfólkatalið í fíggjarvinnuni við 6 ársverkum.

Í september 2008 var gjaldføriskreppa í bankum kring allan heim. Í kjalarvørrinum av teirri sonevndu Sub Prime-kreppuni í USA komu nógv tap undan kavi í amerikonskum og europiskum bankum. Hetta bar í sær, at álitið millum bankar at kalla hvarv, og tí vóru teir trekir at lána pening sínamillum. Ongin vildi taka váðan av at lána einum banka pening, um hesin síðani vísti seg at koma í trupulleikar orsakað av stórum tapum. Tí frystu flestu gjaldførisstreymarnir millum bankarnar, og ein gjaldføriskreppa gjørdist veruleiki.

Í einari óvanligari tíð við óvanligari órógv á fíggjarmarknaðunum og kreppu í heimsbúskap-inum mettu politikarar um allan heim, tað vera neyðugt at skapa stabilitet í fíggjar- og banka-kervinum og tryggleika úti hjá kundunum. Tað varð m.a. í hesum ljósinum, at danska Fólka-tingið fyrst samtykti Bankapakka I í oktober 2008 og síðani Bankapakka II í januar 2009. Saman við einari røð av bankum hava teir føroysku peningastovnarnir gjørt av at vera við í Bankapakka I. Hetta varð gjørt fyri at geva kundunum í føroysk peningastovnunum eina trygging av uppsparingini uppá 100 %.

Peningastovnarnir hava eisini møguleika til at taka lut í bankapakka II fram til 30. juni 2009, um tey meta hetta at vera til fyrimuns fyri penigastovnin. Bankapakki II gevur peningastovnunum m.a. møguleika til at fáa atgongd til eginpening.

Peningastovnarnir meta um útlitini, at tann búskaparlig vøksturin, ið vit hava sæð tey seinastu árini, fer at venda til ein negativan vøkstur í ár. Føroyski búskapurin er grundleggjandi væl fyri, m.a. tí at almenni geirin og húsarhaldini hava lágað skuld. Vøksturin í útflutninginum minkar, tí at prísirnir á maknaðirnum sum heild er falnir fyri flestu vørurnar. Hinvegin hevur písurin á laski hildi sær sera væl. Innflutnigurin til Føroya er minkaður nógv og betrar hetta um gjaldsjavnan.

Rentustøðið er lækkað nakað síðan tað var uppá tað hægsta fyri fáum mánaðum síðani. Orsøkin til lækkingarnar í rentustøðnum eru vánalig búskaparlig útlit. Roknað verður við, at stutta rentan lækkar 75-100bp afturat í ár. Um so verður, kemur útlánsrentan hjá Nationlbank-anum niður á 1,00-1,25 % í heyst. Mett verður, at útlánini hjá peningastovnunum ikki fara at vaksa meira enn 0-5 % í hesum árinum. Lægri vøksturin kemst av minni virksemi/-lánsumsøknum, og hugurin at gera íløgur er minnið. Eftirstøðurnar mótvegis peningastovn-unum hjá vinnuni og húsarhaldunum er ikki vaksin enn, og er tað eitt tekin um, at tað ikki stendur so illa til.

Tó metir fíggjarvinnan, at føroyska fiskivinnan ikki er burðardygg – hvørki fíggjarliga ella lívfrøðiliga. Hetta hevur verið støðan í alt ov nógv ár, og er tað uppá hægstu tí, at hetta sera týdningarmikla mál fær neyðugu politisku umrøðuna og eina framtíðarrættaða loysn.

Fíggjarvinnan mælir til at endurskoða fiskivinnulógávuna. Stór virðir eru í havinum, og er tað tískil umráðandi at fáa mest burturúr tilfeinginum. Rentabiliteturin er ikki nøktandi fyri stóran part av fiskivinnuni og fer ein tillaging av fiskivinnuskipanini at betra um vinnuna og figgingarmøguleikarnir til hesa vinnu.

## *Shippingvinnan*

Shippingvinnan í Føroyum higartil hevur verið lítil. Í fleiri ár hevur tó javnan verið tosað um at byggja hesa vinnu upp, soleiðis at hon verður ein størri inntøkukelda fyri føroyska samfelagið. Og nú sær út til at vón er fyri hesum.

Nýggj lóg um føroya altjóða skipaskráseting – FAS – kom í gildi 1. januar 2009. Samstundis er ein skrivstova fyri FAS-skrivstovuna stovnað, soleiðis at alt, sum hevur við altjóða skipaskrásetingina at gera er savnað á einum stað. Tað hevur síðan verið arbeitt miðvíst fram móti at fáa fleiri skip at skráseta seg undir FAS, og hetta sær út til at gera mun. Síðan FAS skipanin varð broytt, er 1 nýtt skip komið í skipanina, men fleiri eru í ferð við at verða skrásett undir FAS, men tað er ikki endaliga avgreitt.

Kemur gongd á skrásetingina undir FAS eigur hetta at gerast eitt munandi íkast til føroyska búskapin, og tí er neyðugt at halda áfram við eini miðvísari marknaðarføring av hesi skipan.

# Um Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið og feløgini annars

Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar. Felagið arbeiðir fyri, at føroykst vinnulív hevur teir bestu møguleikarnar fyri at kappast, mennast og virka. Við samráðingum og sáttmálum tryggjar Arbeiðsgevarafelagið samstundis góðar og støðugar arbeiðsmarknaðarkarmar fyri vinnuna.

Í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru føroyskar fyritøkur limir, umframt at arbeiðsgevara-samskipanir eru limir í felagnum. Arbeiðsgevarasamskipanirnar eru Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum og Reiðarafelagið fyri Farmaskip.

Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at arbeiða fyri:

1. **Vinnupolitiskum kørmum:** Vegna vinnuna verður arbeitt við, at ávirka allar lógir, kunngerðir og ásetingar annars, sum landsstýri, løgting, umsiting, stovnar og kommunur seta í verk, soleiðis at hesar tæna og ikki darva vinnuni. Vinnufeløgini eru m.a. umboðaði í nógvum ymiskum nevndum, ið seta karmar fyri føroyska samfelagið og framtíð okkara.
2. **Felags sáttmálum fyri vinnuna:** Vegna vinnuna ger Arbeiðsgevarafelagið sáttmálar við løntakarafeløgini, ið tryggja støðug viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og tálma lønarvøkstur í mestan mun.
3. **Kunning:** Arbeiðsgevarafelagið veitir kunning um privatu vinnuna, vinnulig viðurskifti og tann týdning, vinnan hevur fyri samfelagið, bæði beinleiðis og gjøgnum føroyskar miðlar.
4. **Ráðgeving og tænasta:** Felagið veitir limum sínum ráðgeving og tænastur á ymiskum økjum: starvsfólkaviðurskifti og leiðsla, sáttmálar, lógir og reglugerðir á vinnuøkinum v.m. Eisini virkar umsitingin í Vinnuhúsinum sum sambindingarlið við vinnu í øðrum londum.
5. **Fundir og orðaskifti fyri leiðslurnar innan vinnuna:** Felagið hevur átikið sær leiklutin at vera miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti. Skipað verður fyri ymiskum tiltøkum, har bond verða knýtt millum leiðarar í privatu vinnuni - eisini tá húsið er karmur um vitjanir uttaneftir.

Lógir og virðisgrundarlagið hjá felagnum eru lýst á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo .

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag. Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum av Vinnuhúsinum. Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreinafeløgunum, sum húsast saman í Vinnuhúsinum.

## *Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag*

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag leggur linjurnar fyri arbeiðnum í Vinnuhúsinum. Í nevndini sita:

**Jóhan Páll Joensen,**

**formaður**



Jóhan Páll Joensen er stjóri í útflutningsfyritøkuni Maru Seafood. Harafturat er hann nevndarlimur í fleiri føroyskum fiskivinnufyritøkum. Jóhan Páll Joensen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1997 og sum formaður felagsins síðan 2004.

**Kristoffur Laksá,**

**næstformaður**



Kristoffur Laksá er nevndarformaður í prentsmiðjuni Estra í Gøtu. Kristoffur er eisini næstformaður í Føroya Prentsmiðjufelag um-framt nevndarlimur í fleiri føroyskum fyri-tøkum. Kristoffur Láksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.

**Jón Danielsen**

**Nevndarlimur**



Jón Danielsen er stjóri og íverksetari av byggi-fyritøkuni Articon. Jón er nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag umframt nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkuum. Jón Danielsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevara-felag síðan 2004

**Bergur Poulsen**

**nevndarlimur**



Bergur Poulsen er stjóri á fiskamjøls- og fóðurfyritøkuni Havsbrún í Fulgafirði. Harafturat er Bergur nevndarformaður og -limur í fleiri fyritøkum innan føroysku alivinnuna. Bergur hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.

**Meinhard Jacobsen**

**nevndarlimur**



Meinhard Jacobsen er stjóri í útflutningsfyri-tøkuni Faroe Seafood. Harafturat er Meinhard nevndarlimur í fleiri føroyskum fyritøkum. Meinhard hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2007

**Magni Arge**

**Nevndarlimur**



Magni Arge er stjóri í flogfelagnum Atlantic Airways. Magni er eisini nevndarformaður í Oljuvinnufelagnum umframt nevndarformaður og -limur í fleiri fyritøkum innan føroysku ferðavinnuna. Magni hevur sitið sum nevndar-limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1998.

**Jóhanna á Bergið**

**nevndarlimur**



Jóhanna á Bergið er stóri á flutningsfyritøkuni Faroe Ship. Harumframt er Jóhanna nevndar-limur í fleiri føroyskum fyrtøkum. Jóhanna hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevara-felag síðan 2008.

## *Hvør húsast í Vinnuhúsinum*

Í dag eru 17 feløg undir sama taki í Vinnuhúsinum:

Arbeiðsgevarafeløgini eru: Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag (íroknað Havnar Handverksmeistarafelag), Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum, Føroya Prentsmiðjufelag, Reiðarafelagið fyri Farmaskip. Harafturat hevur Føroya Handverksmeistarafelag umsiting fyri fleiri av lokalfeløgunum.

Vinnugreinafeløgini eru: Føroya Havbúnaðarfelag, Føroya Ídnaðarfelag, Føroya Ráfiskakeyparafelag, Føroya Keypmannafelag, Felagið Laksaskip, KT-felagið, Oljuvinnu-felagið, Reklamufelagið, Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya, Ráðgevarafelagið, Ferðavinnufelagið og Felagið Peningastovnar.

Umframt yvirskipaðar vinnukarmar arbeiða arbeiðsgevarafeløgini eisini við sáttmálasamráðingum á privata arbeiðsmarknaðinum, umframt ráðgeving av limunum í hesum sambandi.

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri teirra vinnugrein. Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum. Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipaði av umsitingini í Vinnuhúsinum og Arbeiðsgevarafelagnum. Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY